# Føroya Arbeiðsgevarafelag
# Ársfrágreiðing 2009

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

**Føroya Arbeiðsgevarafelag**

Vinnuhúsið
Smærugøta 9A
Postboks 1038
FO-110 Tórshavn

## Frágreiðingin frá nevndini

Seinastu tvey árini hava verið avbjóðandi fyri føroyska vinnu. Í byrjaði av 2009 var greitt, at heimsumfatandi fíggjarkreppa var, og at hetta fór at fáa álvarsliga ávirkan á komandi tíðina. Ongin væntaði tó, at fíggjarheimurin skuldi renna seg púra fastan, og at eftirfylgjandi búskaparkreppan skuldi gerast so stór.

Hetta merkist eisini her heima hjá okkum. Útflutningsvinnan, sum er so sera týdningarmikil fyri føroyska búskapin, hevur havt stórar avbjóðingar á marknaðunum. Var tað ikki fyri øktu framleiðsluna av alifiski og óvanliga góða prísinum á alifiski, hevði ávirkanin á búskapin verið munandi størri.

2009 hevur fyri allar flestu vinnugreinar verið eitt sera avbjóðandi ár. Fall í eftirspurninginum bæði á útflutnings- og heimamarknaði og trupulleikin við at fáa fígging til virksemið, hevur elvt til, at flestu fyritøkur hava verið noyddar til at siga starvsfólki úr starvi umframt gjørt aðrar tillagingar.

Føroyska fiskivinnan hevur tað ikki gott. Samanfallið millum fallandi prísir og vánaligan fiskiskap, hevur sum áður, ávirkað úrslitini í vinnuni nógv seinasta árið.

Byggivinnan og partar av útflutningsvinnuni eru helst tær vinnugreinar, sum eru harðast raktar. Sera stórt virksemi hevði verið í byggivinnuni í fleiri ár, men eftirspurningurin steðgaði nærum upp í byrjanini av 2009 og hevur ikki tikið seg upp aftur enn.

Tænastuvinnunar annars hava eisini merkt afturgongd. Samskiftis-, KT-, ferða- og handilsvinnan hava, hvør í sínum lagi, gjørt munandi tillagingar av virkseminum.

Sáttmálasamráðingar er týdningarmiklasta uppgávan hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag

Sáttmálasamráðingarnar við arbeiðarafeløgini hava verið í ár. Semjan endaði á einum støði, sum var 3,61% yvir tvey ár. Og hóast hetta er lutfalsliga høgt, so eydnaðist við hesi loysn at koma á mál uttan nakran arbeiðssteðg. Harafturat var Føroya Arbeiðsgevarafelag væl nøgt við, at tað eydnaðist pørtunum at koma ásamt um ein sáttmála fyri fastlønt á fiskavirkjum. Hesar samráðingar vóru tær fyrstu í nýggju samráðingarrunduni og leggja sostatt karmin fyri allar komandi samráðingar í runduni.

Fleiri sáttmálasamráðingar eru fyri framman. Hetta er m.a. sáttmálin við handverkarafeløgini, sáttmálin við fakfeløgini í fíggjarvinnuni umframt fleiri aðrir sáttmálar.

Ein onnur týdningarmikil uppgáva hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag er at hava vakið eyga við tí, sum hendir á vinnupolitska økinum og í samfelagnum annars.

Í Føroyum búgva umleið 50.000 fólk, sum vilja hava eitt livistøði, sum er kappingarført í mun til londini kring okkum. Føroya Arbeiðsgevara-felag vil sjálvandi eisini tað, men heldur, at viljin hjá politisku skipanini at finna loysnir, sum hóska lítla samfelagnum ikki er til staðar. Í staðin fyri at bera so í bandi, at almenni parturin av samfelagnum verður skipaður, soleiðis at tað hóskar til okkara, verða loysnir valdar, sum stór lond brúka. Hetta er ov kostnaðarmikið og hóskar ikki til ta fíggjarorku, vit hava.

Seinastu tvey árini hevur samgongan lagt uppskot fram um pakkar og tiltaksætlanir av ymiskum slagi. Ólavsøkupakkin var eitt átak, vakstrarpakkin annað átak, og fyri stuttum var uppskot lagt fram um fíggjarkarm fyri 2011, sum samgongan ikki stóð saman um, men sum løgtingið samtykti..

Felags fyri hesi átøk hevur verið atgerðarloysi og sera lítil vilja at gera broytingar í almenna bygnaðinum. Búskaparfrágreiðingar hava víst á, at bygnaðarligt hall er á fíggjarlógini, og víst hevur verið á, hvørji hesi eri. Tó hava øll tey átøk, sum hava verið framd, ein felagsnevndara – og tað er, at vinnulívið skal gjalda. Øktu útreiðslurnar í almenna rakstrinum hava verið umrøddar, men einki veruligt átak er gjørt fyri at rationalisera almenna sektorin. Hetta sást væl í kjakinum, sum var um fíggjarkarmin 2011. Nevnast kann sum dømi, at politiskur vilji at gera nýskipanir á t.d. skúlaøkinum var ikki til staðar og tískil kundu rationaliseringar ikki fremjast.

Hetta kann Føroya Arbeiðsgevarafelag als ikki taka undir við og undrast á, at vinnulívið, sum skal standa fyri einum komandi búskaparvøkstri, skal gjalda fyri ovurnýtsluna í almenna sektorinum. Sama vinnulív, sum seinastu tvey árini hevur liðið undir svíkjandi marknaðum bæði úti og heima. Henda tilgongd ger ikki annað enn at leingja um búskaparkreppuna, sum í forvegin rakar hart.

Tað er umráðandi at politiska skipanin fokuserar. Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur at komandi tíðina hevur tað alstóran týdning fyri menning av føroyska vinnulívinum, at nøkur viðurskifti verða tikin upp. Hesi eru m.a. skipan av føroyska arbeiðsmarknaðinum, vinnupolitikkur sum heild, skipan av fiskivinnuni og spurningurin um Føroyar og ES.

Manglar eru á føroyska arbeiðsmarknaðarøkinum. Føroya Arbeiðsgevarafelag eftirlýsir einum miðvísum arbeiði, sum gongur á møti teimum tørvum, sum vinnan hevur fyri at kunna standa seg í kappingini við fyritøkur, sum virka á somu marknaðum, sum vit. Størsta einstaka avbjóðingin hjá vinnuni innan arbeiðsmarknaðarviðurskifti er atgongdin til arbeiðsmegi.

Kappingingarneytarnar hjá føroyskum vinnulívi hava frælsa atgongd til arbeiðsmegi. At føroyskt vinnulív ikki hevur tað merkir, at vit sakta afturút. Arbeiðsloysið er nú umleið 6%. Hetta kann ikki kallast stórt arbeiðsloysi, men tann sannroynd, at 28% at teim arbeiðsleysu eru ung undir 25 ár, er ein avbjóðing, sum ein loysn beinanvegin má finnast á.

Vinnupolitikkurin er farin fyri bakka, og er hetta partvís orsaka av vánaliga samstarvinum millum aðalráðini og tað faktum, at vinnumál er spjadd millum fleiri av teimum. Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til, at aðalráð verða niðurløgd, og at vinnumál verða savnaði undir eitt av teimum.

Vinnuvirkir merkja, at tey eru í kapping við tað almenna um tænastur, og tað er als ikki nøktandi. Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir tí til, at tað almenna fremur munandi útveiting av tænastum og lækkar útreiðslurnar yvirhøvur. Sitandi samgonga hevur gjørt eina roynd at veita okkurt lítið øki út. Hetta hevur ikki gingið væl. Leisturin brúktur verður higartil er, at almennur stovnar bjóða uppgávur út, at almenni stovnurin sjálvur bjóðar uppá uppgávurnar, at almenni stovnurin sjálvur ger av, hvør skal fáa uppgávurnar at loysa, umframt hevur eftirlit við uppgávunum, tá tær verða útførdar. Hetta er ikki haldbært, og Føroya Arbeiðsgevarafelag heitir á politisku skipanina um at steðga hesum beinanvegin.

Føroyska fiskivinnan er sum heild illa fyri fíggjarliga. Úrslitini seinnu árini hava verið vánalig, og fiskiskapurin minkaður. Spurning-urin er, um skipanin fyri fiskiskapin undir Føroyum er nóg góð, tá tað vísir seg, at vinnan ikki klárar at konsolidera seg og enn minni endurnýggja seg.

Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til, at nýggjur fiskivinnupolitikkur verður orðaður, og at atlit verða tikin til alt frá fiskiskapi til marknaðarviðurskifti. Endamálið við einum fiskivinnupolitikki má vera at skipa eina vinnu, sum er lívfrøðiliga burðardygg og búskaparliga haldfør og sum gangnýtir tilfeingið á ein hátt, sum kastar mest møguligt av sær til bæði vinnuvirkir og samfelagið yvirhøvur.

Frágreiðing er latin Landsstýrinum um gagnligasta tilknýti millum Føroya og ES. Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til kjak um frágreiðingina, tí nú er tíðin komin til, at tað í Føroyum verða tiknar avgerðir um, hvussu vit vilja skipa okkum í mun til umheimin. Politisk tøk mugu takast, og mælir Arbeiðsgevarafelagið til, at allir flokkar sessast at finna felags loysnir.

**18. juni 2010**

**Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag**

**Jóhan Páll Joensen, formaður**

# INNIHALDSYVIRLIT

**INNGANGUR** ..... **3**

**HVAT SKAL NÚ GERAST? TILMÆLIR FRÁ FØROYA ARBEIÐSGEVARAFELAG** ..... **4**

VINNU ..... 4
NNUPOLITIKKUR ..... 4
*Endurskoða vinnupolitikin* ..... *4*
*Gjøld á vinnuna* ..... *5*
*Útveiting* ..... *5*
*Vinnupolitisk tilmæli* ..... *6*
ARBEIÐSMARKNAÐURIN ..... 6
*Manglar á arbeiðsmarknaðarøkinum* ..... *6*
*Atgongd til arbeiðsmegi* ..... *6*
*Arbeiðsloysi og ungdómsarbeiðsloysi* ..... *7*
*Studningsskipanir, sum avlaga arbeiðsmarknaðin* ..... *7*
*Barsilsskipanin* ..... *8*
*Fasti Gerðarrættur og semingslógin* ..... *8*
*Tilmæli um arbeiðsmarknaðin:* ..... *9*
GONGDIN Í FISKIVINNUNI ..... 9
*Fíggjarliga og lívfrøðiliga gongdin - uppskot* ..... *9*
*Marknaðurin setir krøv* ..... *10*
*Hvat er til ráða at taka?* ..... *10*
*Fiskivinnupolitisk tilmæli* ..... *11*
FØROYAR OG ES ..... 11
*Enn ein ES-frágreiðing komin* ..... *11*
*Tilmæli um ES* ..... *12*

**MÁL Í 2009 OG 2010** ..... **13**

**SÁTTMÁLASAMRÁÐINGAR** ..... **14**

SAMRÁÐINGARRUNDAN 2007 LOKIN ..... 14
SAMRÁÐINGARRUNDAN 2010 ..... 14
*Sáttmálasamráðingarnar við arbeiðarafeløgini* ..... *14*
*Sáttmálasamráðingar við Flogskiparafelagið* ..... *15*
*Komandi sáttmálasamráðingar* ..... *15*

**TILTØK 2009** ..... **16**

VINNUNÁM ..... 16
VINNUDAGURIN 2009 ..... 16

**GONGDIN INNAN YMISKU VINNUGREINARNAR** ..... **18**

GONGDIN Í FISKI/FLAKAVINNUNI ..... 18
*Rávørutilgongdin* ..... *18*
*Flakavinnan* ..... *18*
*Útflutningurin* ..... *19*
ÚTLITINI FYRI FISKIVEIÐU OG FRAMLEIÐSLU ..... 20
*Fiskiskapurin* ..... *20*
*Marknaðirnir* ..... *21*
ALIVINNA ..... 21
HANDVERKSVINNAN ..... 23
*Gongdin í handverksvinnuni* ..... *23*
*Útlit fyri handverksvinnuna* ..... *24*
KT-VINNAN ..... 24
SAMSKIFTISVINNAN ..... 25
FERÐAVINNAN ..... 25
HANDILSVINNAN ..... 26
*Ódrúgvar vørur – matvøruvinnan* ..... *27*

*Drúgvar vørur - møblar, hvítvørur, v.m.* ..... *27*
OLJUVINNAN ..... 27
FÍGGJARVINNA ..... 28
TRYGGINGARVINNAN ..... 29
SHIPPINGVINNAN ..... 29

**UM FØROYA ARBEIÐSGEVARAFELAG, VINNUHÚSIÐ OG FELØGINI ANNARS ..... 31**

HVØR HÚSAST Í VINNUHÚSINUM? ..... 32
NEVNDIN Í FØROYA ARBEIÐSGEVARAFELAG ..... 33

# Inngangur

Føroya Arbeiðsgevarafelag umboðar flestu arbeiðsgevarar í landinum, og er virksemið hjá okkara limum sum heild grundarlagið undir samfelagnum.

Sum ein týdningarmikil spælari í føroyska samfelagnum átekur Føroya Arbeiðsgevarafelag sær leiklutin sum viðmerkjari og viðspælari í mun til, hvussu samfelagið Føroyar eigur at vera skipað.

Sjónarmið Føroya Arbeiðsgevarafelags verða á hvørjum ári staðfest í ársfrágreiðing felagsins og annars leypandi á heimasíðu felagsins www.industry.fo.

Í ársfrágreiðingum, sum eru lagdar fram undanfarin ár umframt í frágreiðingum frá felagnum annars, eru eisini sjónarmið felagsins um allar tættir, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur hava týdningi fyri føroysku vinnuna og samfelagið.

Hetta ger Føroya Arbeiðsgevarafelag ásannandi, at góðir karmar fyri vinnu og eitt burðardygt vinnulív eru nær tengd at gongdini í samfelagnum.

Ongantíð er hesin leiklutur meira týdningarmikil enn í hesum døgum, tá búskapir um heimin, eisini tann føroyski, hava trupulleikar við at fóta sær.

Í hesi ársfrágreiðingini fyri 2009 nýtir felagið høvi at koma við sínum sjónarmiðum um, hvørji viðurskifti tað hevur týdning at fokusera uppá næstu tíðina. Hetta fyri at skapa loysnir fyri føroyska samfelagið, soleiðis at vit koma styrkt burturúr búskaparliga aldudalinum, vit eru í.

Tað eru óivað onnur viðurskifti, sum høvdu verið týdningarmikil at tikið upp, men Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur valt at fokusera uppá hesi:

- Karmar fyri føroyska vinnu, herundir manglar á arbeiðsmarknaðarøkinum
- Fiskivinnuna
- Spurningin um Føroyar - ES

# Hvat skal nú gerast? Tilmælir frá Føroya Arbeiðsgevarafelag

## *Vinnunnupolitikkur*

### Endurskoða vinnupolitikin

Vinnupolitiska kósin seinnu árini hevur verið ógvuliga ógreið. Føroya Arbeiðsgevarafelag eftirlýsir tískil ein miðvísari vinnupolitik.

Vinnupolitisk rit eru skrivaði í fleiri umførum síðan kreppuntíðina í 90'unum, men ásannandi, at politiska skipanin ikki hevur virt egnar politiskar ætlanir, heldur Føroya Arbeiðsgevarafelag, at partarnir við áhuga fyri vinnupolitikkum mugu sessast og viðgera vinnupolitikkin. Her verður hugsað um partarnar á arbeiðsmarknaðinum og aðrir áhugapartar hjá vinnuni.

Eftir fíggjar- og búskaparkreppuna, sum var í 90'unum, settu arbeiðsgevarafeløgini og fakfeløgini saman við Menningarstovnuni skjøtil á arbeiðið at fáa ein greiðan vinnupolitikk. Hetta var gjørt ásannandi, at eitt sunt og burðardygt vinnulív er grundarlagið undir einum sunnum búskapi. Nú er tíð uppá, at tey, sum hava áhuga í at menna føroyskt vinnulív, fáa vinnupolitikkin aftur á beint og seta út í kortið.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur tey sjónarmið, at tað hevur alstóran týdning, at vinnulóggávan er einføld og eins fyri vinnugreinar. Hetta fyri at tryggja gjøgnumskygni og stimbra hugin hjá teim virkisfúsu. Somuleiðis fyri at tryggja, at vinnulívið hevur fokus á at fáa fyritøkurnar at ganga so væl sum gjørligt, í staðin fyri at fokusera uppá lóggávu og at ganga ørindi til politisku skipanina.

Hetta endamál kann bert náast gjøgnum ein greiðan vinnupolitik!

Hetta er tíverri langt frá vinnupolitisku støðuni, sum hevur verið seinastu árini. Eingin yvirskipaður vinnupolitikkur verður førdur, og vinnumál sum heild hava ikki verið raðfest ella havt tað rúmd, sum neyðugt er. Hetta sæst m.a. aftur í, at vinnumál eru spjadd millum fleiri aðalráð.

At vinnumál liggja spjadd, og at lítil og eingin semja er at hóma millum politisku flokkarnar um vinnupolitik, ger, at eingin kós er á vinnupolitiska økinum.

At málsbýtið er kittið í endaspurtinum, tá samgongusamráðingar eru, hevur elvt til, at so er. Føroya Arbeiðsgevarafelag er sannført um, at tíðin er komin til at minka um talið á aðalráðum og at savna vinnumál í einum aðalráði.

Fíggjar- og búskaparkreppan, sum hevur rakt heimin seinastu tvey árini, hevur lagt trýst á búskapin í flestu londum – eisini í Føroyum.

Politiska skipanin í Føroyum hevur í hesum tíðarskeiðið tó ikki megna annað enn at álagt vinnuni gjøld umframt at økt um umsitingarligu byrðarnar á vinnuna. Viljin til at innrætta føroyska samfelagið, so tað bygnarliga og fíggjarliga hóskar til eitt lítið land, hevur als ikki verið til staðar.

Føroya Arbeiðsgevarafelag eftirlýsir politiskan vilja at seta fokus á viðurskifti, sum kunnu skapa framburð og menning av vinnulívinum, herundir ein íverksetarapolitik.

Dagsins íverksetarar eru framtíðar vinna, og er tað umráðandi at tilskunda stovnsetan av nýggjum fyritøkum. Í hesum sambandi er eisini umráðandi, at okkara útbúgvingarskipan er kappingarfør við útbúgvingarskipanir í øðrum londum, soleiðis at vit ikki missa unga fólki av landinum.

Tað hevur týdning fyri verandi vinnu, at vinnukarmarnar eru skipaðir soleiðis, at til ber at reka vinnu á ein burðardyggan hátt. Her má ein studningsfrí vinna og ein vælskipað og framskygd lóggáva vera grundarsteinurin. Hetta hevði givið grundarlag undir eini fíggjarliga burðardyggjari vinnu við møguleikum fyri menning og styrktum kappingarføri.

## Gjøld á vinnuna

Seinastu árini hevur politiska skipanin lagt umfatandi gjøld á vinnuna fyri at fáa inntøkur til landskassan. Alt ov lítið er gjørt fyri at minka um almennu útreiðslurnar, sum eru vaksnar nógv seinnu árini.

Stóra hallið í landskassanum orsakað av minkandi inntøku av skatti, mvg o.l. hevur sostatt havt lítla ella onga ávirkan á almenna virksemi, meðan vinnan hinvegin er áløgd munandi gjøld og skattingin av ávísum vinnugreinum er økt 50%. Hetta í eini tíð har eftirspurningurin og tískil inntøkurnar eru falnar munandi.

Undrunarvert er, at vinnulívið, har virðini verða skapt, verður knokkroytt av almennum myndugleikum, meðan lítið verður gjørt fyri at tálma almennu útreiðslurnar. Øll eru vit vitandi um, at alheims fíggjarkreppan og eftirfylgjandi búskaparkreppan hevur elvt til, at eftirspurningum eftir vørum og tænastum er minkaður munandi. Hetta hevur tikið grundarlagið undir nógvum fyritøkum, og stórur partur av restini hevur torført við at fáa endarnar at røkka saman. Føroya Arbeiðsgevarafelag óttast hesa gongd, og orsøk er til at halda, at hesin ágangur, sum er á føroyska vinnulívið, fer at halda fram.

Tað er ikki tí, at Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at vinnufyritøkur als ikki skulu gjalda fyri tænastur frá tí almenna. Har lógarkrøv eru, og uppfylging við eftirliti er neyðug, hevur vinnan einki ímóti at gjalda tað, tað kostar.

Trupulleikin er, at politiska skipanin áleggur gjøld, sum ikki svara til kostnaðin av at veita tænastuna. Úrslitið er, at vinnan er við til at fíggja grundraksturin hjá almennum stovnum, sum soleiðis kunnu økja sítt virksemi, tí rokningin verður send víðari.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at tíðin er komin, til at øll gjøld verða endurskoðaði, og at almennir stovnar fáa greið boð um, hvussu prísáseting fyri tænastur til vinnulívið skal fara fram. Tað skulu verða somu reglur galdandi fyri allar stovnar.

## Útveiting

Í mong ár hevur útveiting av sokallaðum framleiðsluuppgávum, sum almennir stovnar gera, verið umrødd. Tó er lítið hent á hesum økinum.

Seinastu tvey árini síggjast avleiðingarnar av hesum. Eftirspurningurin eftir tænastum er minkaður munandi, men virksemi hjá almennu stovnunum stendur við. Hetta merkir, at almennu útreiðslurnar framhaldandi alsamt vaksa.

Hetta gevur greiða mynd av, at almenni sektorurin ikki er førur fyri at gera tillagingar, tá fíggjarligu viðurskiftini krevja tað.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur í fleiri førum víst á skeivu gongdina, men tíverri hendir einki.

Í seinastu ársfrágreiðing síni vísti Føroya Arbeiðsgevarafelag á týdningin av at fáa útveitt almennar rakstraruppgávur. Ikki ber til at siga, at nakað serligt er hent á hesum økinum seinasta árið. Heldur øvugt. Almennir stovnar staðfesta sín rætt at útføra arbeiðir, sum vinnan eins væl kundi tikið sær av.

Endamálið við útbjóðing av almennum uppgávum er umvegis kapping at fáa størri framleidni í tann almenna sektorin og tryggja, at almennir pengar og tilfeingi verða gagnnýtt á best møguligan hátt. Seinastu árini við sera stórum virksemi í landinum hava havt við sær, at almennir stovnar hava bygt út sítt tænastuvirksemi orsakað av, at tað hevur verið trupult at fingið loyst uppgávurnar. Nú vísir tað seg, at hetta tænastuvirksemi kappast beinleiðis við vinnuvirksemi. Hetta ber als ikki til, og mælir Føroya Arbeiðsgevarafelag til, at almennir stovnar niðurleggja slíkt virksemi, tí tað hoyrir ikki tí almenna til.

Sjónarmiðið, sum almennar stovnsleiðslur bera fram er, at almennu stovnarnir eru við til at tryggja kappingina um uppgávur, tí annars gerst monopol ella duopol á økinum. Hetta kann Føroya Arbeiðsgevarafelag als ikki taka undir við. Kappingarráðið hevur uppgávuna at tryggja kappingina, og uppgávan hjá tí politisku skipanini er at geva Kappingarráðnum umstøður til at hava eftirlit

við marknaðinum, soleiðis at vinnufyritøkur í einum lítlum marknaði ikki misnýta sína ráðandi støðu.

Sjón er fyri søgn, tá Landsverk í samband við asfaltarbeiðir tilevnar útbjóðingartilfar, bjóðar uppgávur út, bjóðar uppá uppgávurnar, ger av, hvør kann fáa hesar uppgávurnar umframt hevur eftirlit við teimum. Hetta er als ikki nøktandi. At ein almennur stovnur við Landskassanum í rygginum bjóðar uppá arbeiðir í kapping við smáar fyritøkur, kann ikki annað enn vera kappingaravlagandi.

Tá útveiting verður framd, er uppgávan hjá tí almenna at trygga, at útveittu uppgávurnar verða loystar á nøktandi hátt og í samsvar við tey krøv, sum tað almenna hevur til tænastustøðið til borgaran.

Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til, at almenna skipanin hyggur uppá virksemið á almennu stovnunum og ber so í bandi at uppgávur, sum kunnu útveitast, verða útveittar.

### Vinnupolitisk tilmæli

- Mælt verður til at endurskoða vinnupolitikin og fáa hann aftur á beint
- Mælt verður til at savna vinnumál í einum aðalráði
- Mælt verður til, at leiðreglur verða gjørdar fyri áseting av gjøldum, sum verða løgd á vinnuna
- Mælt verður til, at almennir stovnar og umsting eigur at útveita allar sokallaðar framleiðsluuppgávur.

## *Arbeiðsmarknaðurin*

### Manglar á arbeiðsmarknaðarøkinum

Føroyski vinnulívið má ásannað, at stórir manglar eru í førda arbeiðsmarknaðar-politikkinum Tað mangla politiskar ætlanir fyri, hvussu føroyski arbeiðsmarknaðurin skal skipast og mennast, soleiðis at vinnunar tørvur á verður nøktaður. Dagføringar av arbeiðsmarknaðarlóggávu henda nærum ikki, og sum dømi kann nevnast, at semingslógin er frá 1928.

Føroya Arbeiðsgevarafelag eftirlýsir politiskan áhuga fyri arbeiðsmarknaðinum og kemur niðanfyri inn á fleiri viðurskiftir, sum trongja til umrøðu og raðfesting. Hetta fyri at tryggja ein væl skipaðan føroyskan arbeiðsmarknað, sum kann verða grundarlag undir einum kappingarførum føroyskum vinnulívi.

### Atgongd til arbeiðsmegi

Føroyskar fyritøkur hava ikki frælsi at fáa ta arbeiðsmegi, sum tørvur er á. At føroyski arbeiðsmarknaðurin verður latin upp er umráðandi, fyri at fáa so effektiva og kappingarføra vinnu sum gjørligt. Forðingarnar á føroyska arbeiðsmarknaðinum virka avmarkandi fyri menningina av fyritøkunum, og er hetta til stóran skaða fyri kappingarføri á marknaðunum.

Føroyski búskapurin nýtir gott av útflutningsvinnuni, men útflutningsvinnan fær ikki ment seg í Føroyum sum í øðrum londum, millum annað orsakað av forðingum á arbeiðsmarknaðinum. Sjálvt í hesum døgum við lutfalsliga høgum arbeiðsloysi er trupult at manna fyritøkur við teimum starvsfólkum, tørvur er á. Bæði skip og fiskavirkir hava trupulleikar at fáa starvsfólk.

Kanning[1], sum Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur gjørt millum arbeiðsgevarafeløgini og vinnugreinafeløgini, sum húsast í Vinnuhúsinum, vísir, at føroysk vinna hevur brúk fyri møguleikanum at fáa lætta og skjóta atgongd til arbeiðsmegi frá øðrum londum.

[1] Kanning í samband við hvønn tørv vinnan sær á tættari samstarvi við ES.

Hetta ynski er grundað á, at føroyski arbeiðsmarknaðurin er sera opin, og føroyingar eru flytfør arbeiðsmegi. Hetta er ein fyrimunur, men eisini ein avbjóðing. Fyrimunurin er, at tá arbeiðsloysi er í Føroyum, fara føroyingar av landinum at fáa sær arbeiði. Veikleikin er, at hesi fólk koma kanska ikki aftur, og at tað er sera torført hjá føroyskum fyritøkum at fáa fatur á útlendskari arbeiðsmegi, tá arbeiðsloysið er lítið.

Arbeiðsmarknaðir í londunum kring okkum eru opnir, og føroyingar kunnu fara hagar, men torført er hjá útlendskari arbeiðsmegi at sleppa inn á føroyska arbeiðsmarknaðin.

Sveiggini í føroyska búskapinum eru stór orsakað av eitt nú tilfeingisvinnuni og tí sera lítla, men opna búskapinum. Vit laga okkum skjótt til broyttar umstøður í øllum uttan atgongdini til arbeiðsmegi, og tí er neyðugt hjá okkum at hava liðiligari skipanir. Avleiðingarnar av, at vit ikki hava liðiligar skipanir, tá ferð er á búskapinum, er lønarglíðing og versnandi kappingarføri.

Tí eigur skipanin, sum var í gildi frá á sumri 2008 til á heysti 2009, har ES arbeiðsmegi lættari kundi koma hendavegin, at setast í gildi aftur sum skjótast.

## Arbeiðsloysi og ungdómsarbeiðsloysi

Í 2009 varð lóggávan um Arbeiðsloysisskipanin (ALS) endurskoðað og munandi broytingar gjørdar í skipanini.

Skipanin gevur nú arbeiðsleysum 80% av lønini, tó í mesta lagi 20.000 kr um mánaðin. í útgjaldi. At skipanin nú er vorðin somikið góð setir krøv – krøv bæði til umsitingina av ALS og til politisku skipanina at fylgja upp, soleiðis at skipanin ikki verður misbrúkt.

Tað er somuleiðis umráðandi, at skipað verður soleiðis fyri, at fokus verður sett á at fáa arbeiðsleys aftur í starv, umframt at fylgt verður upp, soleiðis at m.a. svart arbeiðið verður fyribyrgt.

Arbeiðsloysið í Føroyum er nú umleið 6%, harav er ungdómsarbeiðsloysið 28%. At ungdómsarbeiðsloysið er so høgt er ørkymlandi, tí hetta elvir til, at stórur partur av okkara ungdómi byrjar sítt arbeiðslív í arbeiðsloysi.

Í hesum sambandi hevur politiski myndugleikin, ALS og partarnar á arbeiðsmarknaðinum eina stóra uppgávu, sum má loysast. Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur tað vera umráðandi, at vit ansa eftir, at ungdómurin ikki venist við ikki at hava nakað at fara upp til um morgunin.

Vinnumálaráðið, Mentamálaráðið og Almannamálaráðið hava gjørt eitt tilmæli til landsstýrið um, hvussu tiltøk kunnu setast í verk fyri at basa ungdómsarbeiðsloysinum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag tekur undir við, at eitt miðvíst arbeiðið verður gjørt innan hetta øki og metir, at átøk eiga at vera sett í verk beinanvegin.

Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir eisini til, at ALS, Almannastovan og aðrar skipanir, sum møta arbeiðsleysa ungdóminum, seta seg saman og fáa gjørt munandi átøk fyri at basa ungdómsarbeiðsloysinum.

## Studningsskipanir, sum avlaga arbeiðsmarknaðin

Á føroyska arbeiðsmarknaðinum eru skipanir, sum skeikla kappingina um arbeiðsmegina millum vinnugreinar. Her verður hugsað um skattalættan til sjófólk, minstulønarskipanina, fiskavirkisskipanina o.l.

Eingi bati er hendur á hesum økinum seinastu mongu árini, og tað sær út til, at politiski myndugleikin letur eyguni aftur fyri hesum veruleika. Okkurt kjakið hevur tó verið, men uttankonkret úrslit og ongar ætlanir eru um broytingar.

Avlagandi skipanirnar økja um lønartrýstið í teimum vinnum, sum eru í kapping við fiskivinnuna um starvsfólk, og har starvsfólk ikki hava slík serrættindi, og tí mugu hesar vinnugreinar gjalda tilsvarandi meira í lønum og starvsfólkaágóðum. Tískil eigur at verða farið undir eina miðvísa niðurlaging av hesum skipanum sum skjótast.

Stuðulsskipaninar eru somuleiðis viðvirkandi til ov høgt veiðutrýst á fiskastovnarnar. Orsøkin er, at fiskivinnan við hesum almenna studningi ikki í sama mun hevur tørv á at effektivisera vinnugreinina fyri at fáa tað fíggjarliga at hanga saman. Um studningsskipaninar vóru avtiknar, hevði flotin tilpassað seg broyttu umstøðurnar, og helst hevði fiskiskapurin eisini verið meira burðardyggur.

Eisini eigur fiskavirkisskipanin, sum arbeiðs-marknaðurin sjálvur varar av, at verða avtikin. Henda skipan økir um framleiðsluorkuna í vinnugreinini og ger tað torført at fáa lønsemi. Rættast er at bera so í bandi, at eggjað verður til, at framleiðsluorkan í fiskiídnaðinum tillagar seg soleiðis, at tey virkir, sum eru, hava nóg mikið av rávøru til at rinda starvsfólki eina ársløn, sum til ber at liva av. Soleiðis, sum støðan hevur verið seinastu mongu árini, eru tað virkir, sum ikki hava arbeiðið til starvsfólki fulla tíð, men sum dúga uppá fiskavirkisskipanina. Hetta er ikki rímuligt og avlagar kappingina.

Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til, at ein skipað tilgongd við tillaging av hesum skipanum verður sett í verk sum skjótast.

## Barsilsskipanin

Yvirskipað hevur føroyski arbeiðsmarknaðurin eina skilagóða og vælvirkandi barsilsskipan.

Føroya Arbeiðsgevarafelag metir tað tó vera neyðugt at vísa á, at fíggjarliga hongur skipanin ikki saman, soleiðis sum hon er skipað.

Í teimum góðu tíðunum, vit hava havt í Føroyum inntil 2008, gav Barsilsskipanin yvirskot, meðan hon nú við færri lønarútgjaldingum í samfelagnum er farin at geva undirskot. Tað gongur upp og niður, bæði við lønarútgjaldingum og við barnsburðartali, so einki skeivt er í, at skipanin gevur undirskot. Tað, sum er skeivt, er, at sjálv Barsilsskipanin ikki tekur hædd fyri hesum broytingum í inntøku og útreiðslum. Tey árini, hon gevur yvirskot, fer yvirskotið í landskassan. Tað vildi so verið heilt natúrligt, at tey árini, hon gevur undirskot, so rindar landskassin í skipanina aftur.

Hetta er ikki so. Tá undirskot er í Barsilsskipanini, so leggur politiski myndugleikin upp til, at arbeiðsgevarar og løntakarar rinda undirskotið við einum øktum gjaldi til Barsilsskipanina.

Føroya Arbeiðsgevarafelag tekur als ikki undir við hesum hátti at reka eina Barsilsskipan. Skipanin eigur sum skjótast at verða broytt, soleiðis at tað, sum verður goldið ov nógv í góðum tíðum, kann brúkast til at fíggja eitt undirskot í ringum tíðum. Hetta fyri at varðveita eitt støðugt gjald til skipanina, og eisini fyri at sleppa undan, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum í góðum tíðum yvir gjaldið til Barsilsskipanina rinda ein krógvaðan skatt beinleiðis í landskassan og í verri tíðum verða áløgd eyka skatt.

## Fasti Gerðarrættur og semingslógin

Fyrr í ár stóðst stríð um Fasta Gerðarrætt orsaka av einum úrskurði, sum fakfeløgini vóru ónøgd við.

Føroya Arbeiðsgevarafelag meldaði tá út, at tað var ikki sørt bilsið og ørkymlað av reaktiónini hjá nøkrum av teimum stóru fakfeløgunum.

Sáttmálin um Fasta Gerðarrætt var eitt frambrot í søguni hjá føroyska arbeiðsmarknaðinum. Nú fingu vit ein “instans”, har trætur á arbeiðsmarknaðinum kundu viðgerðast og avklárast av einum rætti, sum er valdur av pørtunum á arbeiðsmarknaðinum sjálvum.

Áðrenn vit fingu Fasta Gerðarrætt vórðu trætir á arbeiðsmarknaðinum loystar í ad hoc gerðarrættum, og í Fútarættinum tá talan var um mál um óheimilað stríðsstig. Hetta var ikki ein haldbar støða, og Føroya Arbeiðsgevarafelag hevði tá sum nú ta støðu, at tað besta hevði verið at fingið ein arbeiðsrætt, soleiðis sum vit kenna tað úr øðrum Norðurlondum. Fakfeløgini vóru ímóti hesum, og semja fekst ikki um hetta. Tí varð Fasti Gerðarrætturin í 2006 skipaður sum ein sáttmáli millum allar partar á arbeiðsmarknaðinum.

Atfinningarnar móti Fasta Gerðarrætti hava havt við sær, at nevndin fyri Fasta Gerðarrætt, har Føroya Arbeiðsgevarafelag eisini hevur umboð, er farin undir at endurskoða sáttmálan

um Fasta Gerðarrætt, soleiðis sum heimild verður givin til í sáttmálanum.

Grundað á hesa endurskoðan verður ætlandi í heyst evnað til eitt uppskot um endurskoðaðan sáttmála og um endurskoðaðar reglugerðir.

Sum nevnt omanfyri er galdandi semingslóg frá 1928, og lítið er at ivast í, at hon treingir til at vera dagførd. Ein arbeiðsbólkur var í 2007 settur av Vinnumálaráðnum at arbeiða við uppskoti til nýggja semingslóg. Bólkurin kom nakað ávegis í arbeiðnum, men gjørligt var tó ikki at fáa semju um eitt felags uppskot.

Hetta arbeiði er nú lagt til nevndina fyri Fasta Gerðarrætt at arbeiða víðari við. Tað eru partarnir á arbeiðsmarknaðinum, sum eru við í báðum arbeiðum, og mett verður ikki, at tað tænir nøkrum endamálið at royna at fáa semjur innan bæði økini samstundis.

Nevndin fyri Fasta Gerðarrætt hevur tí boðað frá, at arbeiðið við semingslógini má bíða til endurskoðanin av Fasta Gerðarrættinum er komin á mál.

Føroya Arbeiðsgevarafelag tekur undir við hesi støðu, men vísir tó á, at tað hevur týdning at fáa hetta arbeiði gjørt skjótast til ber. Tað er neyðugt at fáa eina dagførda semingslóg, sum tekur hædd fyri viðurskiftunum á arbeiðsmarknaðinum og í samfelagnum yvirhøvur, soleiðis sum tey eru í dag. Eisini hevur tað týdning, at vit fáa eina semingslóg, sum fevnir um allan arbeiðsmarknaðin og ikki bara hin privata.

### Tilmæli um arbeiðsmarknaðin:

- Mælt verður til at føroyskum vinnulívi verður tryggja fræls atgong til arbeiðsmegi
- Mælt verður til, at tiltøk verða sett í verk fyri at fyribyrgja ungdómsarbeiðs-loysinum
- Mælt verður til, at studningsskipanir, sum avlaga arbeiðsmarknaðin, verða niðurlagaðar
- Mælt verður til at leggja barskilsskipanina í grunn
- Mælt verður til, at semingslógin verður dagførd

## *Gongdin í fiskivinnuni*

### Fíggjarliga og lívfrøðiliga gongdin - uppskot

Føroyska fiskivinnan er illa fyri og á einum vegamóti. Flestu skipabólkar hava torført við at fáa endarnar at røkka saman, og framleiðsluvinnan á landi hevur somuleiðis havt fleiri fíggjarliga tung ár.

Seinasta árið hava fiskaprísirnir verið serliga lágir, tó so at teir hava tikið seg nakað uppaftur seinastu tíðina. Lágu prísirnar og vánaligi fiskiskapurin sær út til at hava tikið grundarlagið undir stórum pørtum av flotanum.

Árini undan 2009, hava fiskaprísirnir verið javnt góðir, men hetta hevur tó ikki verið nóg mikið til, at vinnan hevur konsoliderað seg og soleiðis verið fíggjarliga sterk til at klára tíðarskeið við vánaligum prísum. Sum støðan er og hevur verið í fleiri ár, er ikki annað at siga, enn at skipanin fyri føroyska fiskivinnu als ikki er fíggjarliga haldfør.

Lívfrøðiliga sær ikki mætari út. Ávaringarnar frá fiskifrøðingum hava ljóðað í fleiri ár, men valt hevur verið ikki at lurta eftir teimum í nóg stóran mun. At fiskiskapurin eftir týdningarmiklum fiskasløgum nærum er farin burtur í einki, er tó ein sannroynd og ein viðvirkandi orsøk til, at torført er at fáa endarnar at røkka saman í vinnuni.

Um hugt verður eftir fiskiskapinum undir Føroyum yvir longri áramál sæst, at úrtøkan

sveiggjar nógv. Summi ár er fiskiskapurin heilt góður og liggur væl omanfyri tað, sum mett verður, at grunnarnir undir Føroyum kasta av sær. Onnur tíðarskeið er fiskiskapurin væl minni, enn mett verður, at grunnarnir kunnu kasta av sær, um vinnan verður burðardygt umsitin.

Hetta ger, at fiskivinnan verður ávirkað av sera stórum sveiggjum í úrtøkuni. Tá so prísgongdin harafturat hevur verið, sum vit hava sæð seinastu tíðina, klárar vinnan ikki at standa ímóti, tí hon er ov illa fyri fíggjarliga.

Toskurin, sum er kostnaðarmiklasta fiskaslagið saman við hýsuni, er vanliga álitið hjá húkaflotanum, sum nú er sera illa fyri fíggjarliga. Vánaliga umsitingin av fiskastovnunum er viðvirkandi til, at fíggjarligu úrslitini eru so vánalig. Sjálvt um hetta er so, hevur politiska skipanin, umframt partar av veiðuliðnum, ógvuliga torført við at viðurkenna, at ov stór veiðuorka er inni í flotanum.

## Marknaðurin setir krøv

Marknaðarrákið seinnu árini hevur verið, at evropisku innkeypararnir av fiskavørum í alt størri mun eftirspyrja eina skjalprógving av, at fiskurin, teir keypa, er frá einum lívfrøðiliga burðardygt umsitnum fiskastovni. Hesi skjalprógv klárar føroyska útflutningsvinnan ikki at bera fram.

Vandi er tí fyri, at føroyskar fiskavørur ikki í sama mun sum fiskavørur frá øðrum londum, har burðardygdin kann skjalprógvast, eru kappingarførar. Tískil standa føroyskir veitarar seg ikki í kappingini um bestu keypararnar. Hetta merkja m.a. tey, sum útflyta upsa til evropiska marknaðin, og seinasta árið hevur sølan av hýsuverðum til bretska marknaðin fingið rættuligt bakkast.

Málið viðvíkjandi støðurni hjá føroysku hýsuni hevur fylgt rættuliga nógv í kjakinum hjá vinnuni og politisku skipanini her heima. Fundir hava verið millum føroyska vinnu og umsiting við bretska felagið Seafish. Hetta átak varð fyriskipað fyri at kunna um føroysku fiskiveiðuskipanina og fyri at fáa Seafish at kunna í Bretlandi.

Einki ítøkiligt er komið burturúr hesum, og eingi tiltøk eru gjørd fyri at minka um veiðutrýstið á hýsuna, so aftur ber til at virka lidnar vørur burturúr henni.

## Hvat er til ráða at taka?

Hetta er ikki ein støða, sum føroyska fiskivinnan tolir. Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir tí til, at vinna og myndugleikar seta seg saman fyri at semjast um, hvussu føroyska fiskivinnan skal umsitast, soleiðis at tað til eina og hvørja tíð ber til at fáa sum mest burturúr tí tilfeingi, sum er.

Føroya Reiðarafelag hevur lagt uppskot fram um, hvussu til ber at stilla fiskidagaskipanina so skipanin fæst aftur á beint. Tilmælir eru um ikki at fiska fiskin fyrr enn eftir, at hann hevur gýtt.

Útgangstøðið fyri hesum er at skipa soleiðis fyri, at fiskurin er størri og tískil hevur størri virðið, tá hann verður tikin í fiskiskapi, og somuleiðis at ansa eftir, at allur fiskur fær høvi at gýta fyri at tryggja, at avkom kemur undan. Somuleiðis vísir Reiðarafelagið á, at í summum skipabólkum eru ov nógv skip í mun til tað tilfeingið sum er.

Hesi sjónarmið kann Føroya Arbeiðsgevarafelag taka undir við. Spurningurin er tó, um hetta er nokk til at tryggja burðardygga tilgongd til fiskastovnarnar.

Tað er tørvur á einum fiskivinnupolitikki, sum ikki bara er lokalpolitikkur í Føroyum, men sum eisini hugsar um marknaðin. Tað er á marknaðinum, at avgerðirnar verða tiknar um, hvørt eitt fiskaslag er burðardygt umsitið. Hetta krevur av fiskavøruframleiðandi tjóðunum, at hesar í umsiting og fiskiskapi taka tey atlit, sum eru neyðug, fyri at tað hjá vinnuni skal bera til at selja vøruna til hægsta prís.

Annað mál, sum hevur hevur verið umrøtt seinastu tíðina, er málið um, hvørt føroyingar hava størri rættindi til makrel enn tað, sum Føroyar hevur fingið tillutað í fiskiveiðusamráðingunum seinastu árini.

Tað er sera týdningarmikið fyri Føroyar og føroyska búskapin, at fokus er á at tryggja tey fiskiveiðurættindir, sum eru, umframt at krevja tann rætt Føroyar hava.

Grundarlagið undir hesum krøvum eigur at verða haldgóð vísindalig prógv. Um haldgóð vísindalig prógv skulu fáast til vega er umráðandi, at umstøður verða givnar til, at okkara Havstova kann gera neyðugar kanningar.

Somuleiðis hevur tað alstóran týdning, at tá Føroyar seta fram krøv, sum í hesum førinum, so er tað ein samla vinna, sum stendur aftanfyri og bakkar upp um samráðingarnar. Um hetta skal henda, so mugu fyrireikingarnar til at reisa slík krøv gerast væl og virðiliga, soleiðis at ivi hvørki úti ella heima kann reisast um, at Føroyar hava rættin á sínari síðu.

Førleiki til samráðingar er altavgerðandi í sambandi við fiskiveiðusamráðingarnar eins og aðrar samráðingar.

Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir tí til, at allar millumlanda samráðingar vegna Føroyar verða skipaðar í einum felags umhvørvi í miðfyrisitingini. Hetta fyri at tryggja førleika, fjølbroytni og rekruttering til samráðingarliðið.

Um tikið verður samanum kann sigast, at tað eru stórar avgerðir fyri framman fyri føroyska fiskivinnu. Politiskt má man seta sær ætlanir og mál fyri, hvussu føroyska samfelagið skal gagnnýta tilfeingið framyvir.

Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir tí til, at ein nýggjur fiskivinnupolitikkur verður gjørdur. Fiskivinnupolitikkurin má bróta upp úr nýggjum, og endamálið má verða at fáa eina fiskivinnu, ið er lívfrøðiliga burðardygg. Verður tað gjørt, ber til at handla á teimum marknaðum, sum geva besta prísin.

Er fiskivinnan lívfrøðiliga burðardygg, gerst lønsemi betri og vegurin móti eini fíggjarliga burðardyggari vinnu liggur opin.

### **Fiskivinnupolitisk tilmæli**:

- Mælt verður til, at fiskivinnupolitikkur verður orðaður.
- Mælt verður til, at fiskivinnupolitikkurin tryggjar eina fíggjarliga og lívfrøðiliga burðardygd.
- Mælt verður til, at dentur verður lagdur á at gera vísindaligar kanningar, sum kunnu stuðla undir Føroya krøvum í fiskiveiðurættinda høpi.
- Mælt verður til at savna altjóða samráðingar undir einum í miðfyrisitingini.

## *Føroyar og ES*

### Enn ein ES-frágreiðing komin

Fyri stuttum kom frágreiðing, sum lýsir hvørjir møguleikar eru hjá Føroyum at fáa tættari tilknýtið til ES. Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur luttikið í hesum arbeiði og metir, at umráðandi er, at henda frágreiðing verður tikin upp til kjak.

Í sambandi við arbeiðið við ES-frágreiðingini setti Vinnuhúsið seg í samband við øll arbeiðsgevarafeløg og vinnugreinafeløg í landinum fyri at fáa hesi at kjakast um og gera niðurstøður um, hvussu tey meta um tørvin hjá vinnugreinunum á tættari tilknýtið til ES.

Út frá sjónarmiðunum hjá ymisku vinnugreinunum kann ikki annað sigast enn, at føroyska vinnan bert í avmarkaðan mun hevur tørv á tættari samstarvi við ES. Samanumtikið kann sigast, at vinnan vísir á, at fræls atgongd til arbeiðsmegið (sí nærri um hetta undir *Arbeiðsmarknaðurin*) og fræls marknaðar-atgongd eru týdningarmiklastu viðurskiftini fyri menning av føroyskari vinnu framyvir.

Marknaðaratgongdin er eitt gjøgnumgangandi ynski hjá føroyskari útflutningsvinnu, serliga alivinnuni og fiskivinnuni, sum eru

primervinnugreinar í Føroyum og marginalvinnur í ES. Tað hevur alstóran týdning fyri hesar vinnugreinar, at tær hava somu kappingartreytir á marknaðinum sum kappingarneytarnir.

Fiskiídnaðurin ynskir, at fáa betur marknaðaratgongd, soleiðis at tær kvotur, sum eru á fiskavørum inn til ES verða burtur. Hesar kvotur eru, sum er, ein forðing fyri menning av nýggjum vørum, og soleiðis eisini av vinnuni. Nøgdirnar av fiskavørum, sum Føroyar kunnu veita ES marknaðinum, eru avmarkaðar og sostatt sera smáar í mun til marknaðin í ES.

Føroya Arbeiðsgevarafelag metir tí, at tað eigur at bera til at gera ein sáttmála við ES um frælsan handil fyri fiskavørur, ella í minsta lagi at fáa broytt handilssáttmálan soleiðis, at hann heldur hevur ein negativlista yvir vørur, sum ikki kunnu handlast frítt, í staðin fyri tann positivlista yvir vørur, sum kunnu handlast, ið er í løtuni.

Føroyska alivinnan ynskir, at Føroyar gerast limur í ES, soleiðis at alivinnan ikki kann ákærast fyri dumping av alifiski á ES-marknaðin. At fáa slíkar ákærur er bæði kostnaðarmikið og tíðarkrevjandi, og í longdini heldur alivinnan ikki, at tað ber til at liva við, at hava vandan fyri ákæru um dumping hangandi yvir sær.

Viðvíkjandi fiskivinnuni á sjónum so metir Føroya Arbeiðsgevarafelag, at tað ikki er ráðiligt at gerast partur av fiskivinnupolitikkinum hjá ES. Hetta sjónarmið byggir á, at Føroyar verða einasta landið í felagsskapinum, sum at kalla bert livir av tí, sum havið kann geva. Tí eru vinnupolitisku avbjóðingarnar heilt øðrvísi fyri føroyska fiskivinnu enn fyri ES fiskivinnu.

Viðvíkjandi gjaldoyranum, so er ymiskt, hvat vinnur meta vera besta loysnin. Fiskiídnaðurin vísir á, at tað hevði verið lættari at havt evruna. Hinvegin mælir fíggjarvinnan frá, at Føroyar fáa sær annað gjaldoyra enn Danmark, tí tilknýtið til Danmark er so stórt.

Sum eitt lítið samfelag í Evropa, ið fyri mesta partin útflytir sínar vørur til ES, eru Føroyar í stóran mun tengdar at ES marknaðinum og ES skipanini. Føroyar eru tí serstakliga útsettar, um ES í framtíðini fer at føra ein meira verjukendan politik.

Tað merkir, at føroyingar longu nú mugu gera sær greitt, um Føroyar kunnu loyva sær ikki at verða nærri knýttar at ES. Føroyskt vinnulív hevur brúk fyri bæði í styttri og longri framtíð, at fáa frælsa atgongd til arbeiðsmegi. Hetta er avgerandi fortreyt fyri, at føroyskt vinnulív kann mennast.

Samanumtikið heldur Føroya Arbeiðsgevarafelag, at tá hugt verður eftir tørvinum hjá vinnuni í longri framtíð, at tað hevur týdning fyri føroyska vinnu at nærkast ES.

ES er okkara týdningarmesti marknaður, og tað verða eisini fyritøkur úr ES, sum føroysku fyritøkurnar skulu kappast við í framtíðini. Tí hevur tað týdning fyri menning og framtíðarmøguleikar hjá føroyskum fyritøkum og føroysku vørum, at tær eru á sama palli, sum ES fyritøkur og ES vørur.

## Tilmæli um ES

- Mælt verður til, at ES-frágreiðingin verður tikin upp til kjak
- Mælt verður til, at politiskar loysnir verða funnar, soleiðis at føroyskar vørur fáa lættari atgongd til ES-marknaðin og dumping ákærur kunnu umgangast
- Mælt verður til, at fræls atgongd verður til arbeiðsmegi frá ES-økinum

## MÁL í 2009 og 2010

Í hesum partinum av ársfrágreiðingini verða nevnd yvirskipaði mál frá farna árið, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur verið partur av, og sum eru umráðandi fyri vinnuna.

- Vinnufelagslógirnar vórðu dagførdar í 2008 og munandi dagføringar vórðu gjørdar bæði í 2009 og 2010. Føroyska vinnulógávan er nú í tráð við altjóða, einamest ES, reglur. Føroya Arbeiðsgevarafelag tekur undir við hesum dagføringum, tí tað hevur týdning at samsvar verður verandi millum føroyska løggávu og løggávu í londunum kring okkum.

- Í fleiri ár hevur verið arbeitt við einum eftirlønarreformi, sum skal føra við sær, at tvungin eftirlønaruppsparing verður sett í verk fyri allar føroyingar. Í ársfrágreiðingini 2008 varð sagt, at tað sá út til, at uppskot um hetta fór at verða lagt fyri tingið í tingsetuni 2009. Hetta er ikki hent enn, og í løtuni situr ein politiskur fylgibólkur við málinum. Føroya Arbeiðsgevarafelag fylgir sjálvandi við gongdini viðvíkjandi hesum.

- Nýggj matvørulóg er løgd fram fleiri ferðir seinastu árini. Í hesi tingsetuni varð lógin endiliga samtykt. Feløgini, sum varða av matvøruframleiðsluni, hava havt lógina til hoyringar og gjørt viðmerkingar til hana. Staðfestast kann, at vit nú hava eina matvøruløggávu, sum neyðug er, fyri ótarnað at kunna útflyta matvørur til ES-marknaðin.

- Fleiri lógir og kunngerðir, sum áleggja vinnuni at gjalda gjøld, eru lagdar fyri Løgtingið hesa tingsetuna. Somuleiðis er onnur løggáva dagførd soleiðis, at gjøld eru hækkaði. Hetta hevur serliga rakt alivinnuna og fíggjarsektorin.

- Mvg-frádrátturin av handverkaralønum sum setahúsaeigarar hava havt gleði av er lækkaður við 50.000 kr seinasta árið. 1. juli 2011 lækkar frádrátturin við 50.000 kr afturat og komandi summar verður hesin frádráttarmøguleiki burtur.

- Loksins er avtalan við ES um granskingarsamstarv undirskrivað. Avtalan hevur verið ávegis í fleiri ár, men torført hevur verið at fingið politiska undirtøku fyri játtanini, sum skuldi til, fyri at avtalan skuldi kunna setast í verk. Nú er avtalan undirskrivað, og tað fegnast Føroya Arbeiðsgevarafelag um.

- Landsstýriskvinnan í Innlendismálum hevur latið gjørt mál fyri minking av føroyska $CO^2$ útlátinum. Umboð fyri vinnuna hava luttikið í arbeiðnum.

- Umfatandi løggáva er sett í gildið innan fíggjarøkið seinasta árið. Hetta er gjørt sum ein dagføring av føroysku løggávuni og fyri at fáa føroyska løggávu á økinum at líkjast meira ES-løggávu.

  Harafturat eru settir í verk tveir sokallaðir bankapakkar, sum hava spent eitt trygdarnet undir peningastovnarnar í danska ríkinum. Somuleiðis er innskjótaratrygdin økt frá 300.000 kr til umleið 750.000 kr.

# Sáttmálasamráðingar

## *Samráðingarrundan 2007 lokin*

Seinasti sáttmálin í samráðingarrunduni, sum byrjaði í 2007, kom uppá pláss beint fyri jól 2009. Talan var um sáttmálarnar millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelagið fyri Føroya Tele og Posta.

Semjan um nýggjar sáttmálar var ein 1-ára semja, og sáttmálarnir ganga sostatt út 31. desember 2010.

Kostnaðurin av nýggju sáttmálunum var 3,2% fyri hetta eina árið. Nakað av karminum fór til hækkaði vaktargjøld, og annars fór restin á lønina. Hækkingin, sum nú varð løgd á hesar sáttmálar, er hin sama, sum arbeiðarafeløgini fingu 1. mai 2009 og handverkararnir 1. oktober 2009.

## *Samráðingarrundan 2010*

### Sáttmálasamráðingarnar við arbeiðarafeløgini

Sáttmálasamráðingarnar við arbeiðarafeløgini byrjaðu tann 16. mars í ár. Sáttmálasamráðingarnar gingu lutfalsliga væl, og tað eydnaðist pørtunum at koma ásamt um ein sáttmála fyri fastlønt á fiskavirkjum.

Tó varð neyðugt at tilkalla semingsmenninar, Terje Sigurðsson og Símun Absalonsen, tá lønarspurningurin var eftir. Leygarkvøldið 8. mai løgdu teir semingsuppskot fyri partarnar, og mánadagin 10. mai boðaðu báðir partar frá, at teir tóku undir við uppskotinum.

Sostatt var semja um ein 2-ára sáttmála, har lønin 1. mai 2010 hækkar við 1,10 kr/tíman til 110,37 kr/tíman og eftirlønin við 0,3% til 9,4%. 1. mai 2011 hækkar lønin við 2,15 kr/tíman til 112,52 kr/tíman og eftirlønin við 0,5% til 9,9%. Hetta gevur ein samlaðan karm yvir 2 ár á 3,61%.

Aðrar broytingar í sáttmálunum vóru m.a.:

- Allar viðbøtur (viðbótin fyri vaktarhald á skipum tó undantikin) í sáttmálunum eru broyttar úr krónum til procentir.
- Í sambandi við døgndrift og skiftisvakt skal fráboðast 24 tímar frammanundan vaktarskifti byrjar.
- Í sambandi við at fólk fara úr starvi hevur arbeiðsgevari nú skyldu at geva arbeiðsfólkinum váttan um starvstíðina hjá arbeiðsfólkinum.

  Hinvegin hevur arbeiðsfólkið, fyri at fáa starvstíðarviðbót frá nýggjum arbeiðsgevarar, skyldu at kunna um møguliga starvstíð frá øðrum arbeiðsgevara við setan og í seinasta lagi, tá setanarprógvið verður undirskrivað.
- Um arbeiðsfólkið biður um tað, og um viðkomandi hevur verið í starvi í minst 3 ár, skal arbeiðsgevarin skrivliga grundgeva fyri uppsøgn av arbeiðsfólkið,
- Til ber, eftir avtalu við avvarandi felag, at gjalda løn út mánaðarliga.
- Jólaaftan er broyttur frá at vera hálvur frídagur til at vera fullur frídagur.

Eisini vóru broytingar gjørdar í landarasáttmálanum og gistingarhús-sáttmálanum.

Afturat hesum fegnast Føroya Arbeiðsgevarafelag um, at tað bar til at koma ásamt um ein fastlønarsáttmála fyri fiskavirkini, soleiðis at til ber at knýta fólk tættari at virkinum, afturfyri at tey fáa eina fasta mánaðarløn. Kunnað var um nýggja sáttmálan á fundi við fiskavirkini, og var sáttmálin tá væl móttikin.

At síggja til liggur semingsuppskotið nakað høgt í mun til, hvat føroysk vinna tolir í løtuni. Hóast hetta metir nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag, at semingsuppskotið samanumtikið mátti góðtakast. Útlitini til at fáa eitt betri úrslit eftir ein møguligan arbeiðssteðg vóru vánalig, og tað hevði verið at lagt stein oman á byrðu hjá føroyskari vinnu, at sagt nei

til uppskotið, og soleiðis skula sett verkbann í verk.

## Sáttmálasamráðingar við Flogskiparafelagið

Sáttmálin millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Flogskiparafelag Føroya gekk út 1. apríl í ár. Hetta er fyrstu ferð, at samráðst verður um henda sáttmála, eftir at hann kom undir Føroya Arbeiðsgevarafelag í apríl 2009.

Samráðingarnar um nýggjan sáttmála, sum byrjaðu 9. mars í ár, gingu sera striltið, og Flogskiparafelag Føroya vrakaði eitt uppskot frá semingsmonnunum 24. apríl. Eftir hetta var samband aftur og fram millum partarnar, og 10. mai var semja at leingja verandi sáttmála í eitt ár, til 1. apríl 2011, uttan nakrar broytingar.

## Komandi sáttmálasamráðingar

Til 1. juni 2011 ganga 21 sáttmálar, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag (saman við undirfeløgum tess) varar av, út. Hesir eru:

| | |
|---|---|
| 1. juni 2010 | Sáttmáli við Maskinmeistarafelagið fyri maskinmeistarar á landi. Er ikki uppsagdur og heldur tí áfram óbroyttur. |
| 1. oktober 2010 | Sáttmálin við Føroya Handverkarafelag og Landsfelag Handverkaranna |
| 1. oktober 2010 | Sáttmálin við Felagið av Grækarismessu 2008 fyri flogmekanikarar |
| 1. november 2010 | Sáttmálin við Súluna fyri flogternur |
| 1. januar 2011 | Sáttmálarnir við Starvsmannafelagið fyri Posta og Føroya Tele |
| 1. mars 2011 | Sáttmálarnir við Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Maskinmeistarafelagið og Føroya Fiskimannafelag fyri manningar við handilsskipum |
| 1. apríl 2011 | Sáttmálin við Flogskiparafelag Føroya |
| 1. mai 2011 | Sáttmálarnir við Yrkisfelagið Trygdina, Starvsfólkafelag Føroysku Sparikassanna og Finansforbundet fyri starvsfólk í bankum og tryggingarfeløgum |
| 1. mai 2011 | Sáttmálin við S&K |
| 1. mai 2011 | Sáttmálin við Prentarafelagið |

# Tiltøk 2009

## Vinnunám

Vinnunám er skeiðstænastan hjá Vinnuhúsinum. Her verður skipað fyri skeiðum og kunningardøgum til limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag og arbeiðs-gevarafeløgum undir hesum.

Upprunaliga endamálið við Vinnunám var at vera við til at økja um fakliga førleikan hjá fyritøkum - bæði á leiðslustøði, og eisini innan ítøkiligar partar av gerandisdegnum í eini fyritøku.

Tað hevur tó víst seg, at tá skipað verður fyri yvirskipaðum skeiðum, sum ofta takað 2-3 dagar, er undirtøkan ikki stór. Hinvegin er áhugin stórur, tá skipað verður fyri kunningar-døgum um meiri ítøkilig mál.

Vinnunám hevur sostatt lagt seg eftir at bjóða limunum skeið og kunningardagar, sum er beinrakin og viðkomandi fyri vinnuna á einum ítøkiligum støði.

Hetta síðsta árið hevur verið skipað fyri kunningardøgum um "MiFID Markets in Financial Instruments Directive", "Vegurin sum arbeiðspláss" og tiltak um arbeiðsskaðatryggingar hevur verið. Eisini hevur verið skipað fyri einum tiltakið fyri limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag um, hvussu vit fáa meira burturúr útflutningsvinnuni.

## Vinnudagurin 2009

Vinnudagurin 2009 var merktur av tí støðu, sum føroyskt vinnulív var í um hetta mundi, og luttøkan var nakað slakari enn vanligt. Hóast hetta meta vit, at dagurin var væleydnaður. Hetta var 10. ferð, at skipað varð fyri Vinnudegnum. Sjálvt um hann kanska eigur at vera tillagaður nakað, so er tað gott hjá føroyskari vinnu at vera saman um ein dag, sum er vinnunar burturav, ikki minst í truplum tíðum sum nú.

Á Vinnudegnum vóru sum vanligt Ársins Átak og Ársins Virki kosin.

Ársins Átak var Matfestivalurin, sum var í Tórshavn 22 .august 2009. Í grundgeving síni segði dómsnevndin m.a.

*Samanumtikið er Matfestivalurin valdur sum Ársins Átak, tí matfestivalurin:*

- *er ein kærkomin sýnisgluggi hjá framleiðarum av føroyskum rávørum á bygd og í býi*
- *er við til at økja tilvitanina hjá vanliga føroyinginum um føroyskar rávørur og tað margfelda ríkidømi, ið her er,*
- *og hann er við til at økja áhugan fyri føroyskari matlist og matstovumentan, grundað á føroyskar rávørur.*

*Ein fortreyt fyri at vera ein góður seljari er, at ein kennir og virðir ta vøru, ið ein selur. Vit føroyingar "selja" okkara land hvønn dag. Matfestivalurin er við til at økja okkara kunnleika, áhuga og virðing fyri føroyskum rávørum, mati og matlist. Og hann kann vónandi vera við til at lata eyguni upp fyri enn fleiri møguleikum at nýta føroyskar rávørur.*

*Alt hetta er til gagns fyri trivnaðin hjá okkum føroyingum, til gagns fyri áhugan fyri Føroyum sum ferðamannaland og til gagns fyri áhugan hjá útlendingum at keypa okkara útflutningsvørur.*

*Valið av Matfestivalinum skal síggjast sum ein heiður til øll tykkum, ið framleiða føroyskar rávørur, og til øll tykkum innan matstovu-, ferðamanna- og útflutningsvirksemi, ið dagliga leggja dent á føroyskar rávørur og hjúkla um dygdina og tað serliga í teimum.*

Dómsnevndin valdi Bakkafrost til Ársins Virki 2009. Í grundgeving síni segði dómsnevndin m.a.:

*Vit fáa støðugt fleiri av hesum fyritøkum, ið meta um, hvør heildarstrategi best kann byrgja upp fyri óvissum, ið tær kunnu hava ávíst ræði á, og sum við valdu strategiini fáa tann stabilitet og effektivitet í rakstrinum, sum gevur vøkstur og framhaldandi menning av fyritøkuni.*

*Ein av hesum fyritøkum er Bakkafrost. Á Bakka hevur verið vinnuligt virksemi í kanska 100 ár ella meira bygt upp á tað, sum fjørðurin og havið hevði at geva. Tað er næstan ikki tað fiskaslag, sum ikki hevur verið virkað á Bakka, ið eisini tíðliga kom upp í aling við øllum tí, sum fylgdi við her. Men í 1992 verður tann strategi løgd, sum hevur verið fylgd líka síðan, og sum hevur givið ta menning og tann vøkstur, at fyritøkan í dag er tann nógv største innan fiskaaling í Føroyum og er millum størstu útflutningsfyritøkurnar í landinum. At hava biologiska trygd, bæði veterinert og tá tað snýr seg um at fáa rávøru, at skapa jøvn og góð prísviðurskifti við miðvísari sølu beinleiðis vend til endabrúkaran, og at skapa jøvn og góð inntøkuviðurskifti við langsiktaðum samanhangi av allari virðisketuni, aling, liðugtframleiðslu og sølu, hevur verið tann strategi, sum hevur ført á mál.*

*Fyritøkan er í dag í samanlegging við Vestlax og fer eftir samanleggingina 1. januar komandi at ala eini 30.000 tons árliga, harav knappliga helvtin verður í retail-pakningi. Miðað verður eftir, at fyritøkan skal skrásetast á virðisbrævamarknaðinum í Oslo og verða burtur av altjóða fyritøka, við teimum krøvum um burðardygd og gott langsiktað avkast, ið eigararnir fara at krevja av henni. Fyritøkan hevði við seinastu ársuppgerð eina eginogn upp á 229 mió. kr. og eitt ársúrslit upp á 37 mió. kr. Starvsfólkatalið hevur verið støðugt vaksandi og var knappliga 300 við ársbyrjan.*

# Gongdin innan ymisku vinnugreinarnar

## *Gongdin í fiski/flakavinnuni*

### Rávørutilgongdin

Um hugt verður eftir fiskiskapinum seinastu tvey árini, kann staðfestast, at feskfiskaveiðan í 2009 var so at siga tann sama sum í 2008, t.e. á leið 112.000 tons. Broytingar eru tó millum fiskasløgini. M.a. er nøgdin av hýsu – og í minni mun toski – lækkað, meðan nøgdin av upsa er nakað hækkað.

Avreiðingarvirðið á feskum fiski var knappar 777 mió.kr. í 2009 móti góðum 900 mió.kr. í 2008, ið lutfallsliga svarar til eina virðislækking á umleið 14%.

Talvan niðanfyri vísir, at stóra virðisfallið serliga stavar frá lægri miðalprísi á toski, hýsu og øðrum botnfiski. Tó er miðalprísurin á upsa hækkaður nakað.

| | Nøgd í tonsum | | Virði í 1.000 kr. | | Miðalprísur pr. kg | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Fiskaslag** | **2008** | **2009** | **2008** | **2009** | **2008** | **2009** |
| **Toskur** | 11.734 | 10.830 | 237.948 | 138.629 | 20,28 | 12,80 |
| **Hýsa** | 7.453 | 5.217 | 84.154 | 47.876 | 11,29 | 9,18 |
| **Upsi** | 51.013 | 53.505 | 259.045 | 298.135 | 5,08 | 5,57 |
| **Annar botnfiskur** | 11.853 | 11.812 | 109.605 | 85.838 | 9,25 | 7,27 |
| **Flatfiskur tils.** | 5.379 | 5.036 | 112.867 | 107.895 | 20,98 | 21,42 |
| **Onnur fiskasløg tils.** | 24.427 | 25.738 | 99.258 | 98.183 | 4,06 | 3,81 |
| **Veiðan tilsamans** | **111.859** | **112.139** | **902.876** | **776.556** | | |

### Flakavinnan

Teir almennu roknskapirnir fyri 2009 eru ikki allir tøkir enn, men tað ljóðar frá virkjunum, at úrslitini í 2009 líkjast teimum frá 2008.

Almennu roknskapartølini frá 2008 vísa at samlaða úrslitið hjá flakavirkjunum var sera vánaligt. Ein samanteljing av ársúrslitunum gevur nevniliga eitt hall á góðar 70 mió. kr.

Skulu vit lýsa gongdina hjá teimum feløgnum, ið primert eru flakavirkir er helst rættast at tillaga fyri úrslitinum frá dóttur- og tilknýttum feløgum. Um hetta verður gjørt, fæst eitt samlað úrslit, áðrenn skatt og óvanligar postar, sum gevur eitt hall á góðar 7 mió.kr. Hetta er á leið 1,5 mió. kr. verri enn í 2007.

Hóast samlaða myndin ikki sá góð út, var tó ójavnt, hvussu 2008 royndist hjá ymisku feløgunum. Á myndini niðanfyri sæst, at 10 feløg høvdu avlop áðrenn skatt og óvanligar postar, meðan 9 feløg høvdu hall. Feløgini við positivum úrsliti høvdu tilsamans góðar 20 mió.kr. í avlopi, meðan feløgini við negativum úrsliti høvdu tilsamans góðar 27 mió.kr í halli. Í 2007 vóru hesi tøl ávikavist 12 og 17 mió. kr., og tí kunnu vit siga, at áðrenn skatt og óvanligar postar, hava virkini við avlopi samanlagt klára seg betri í 2008 enn í 2007, meðan virkini við halli samanlagt hava klára seg verri.




## Útflutningurin

Í 2009 var samlaða útflutta nøgdin av fiskavørum 284.000 tons. Hetta er ein minking á umleið 45.000 tons í mun til 2008, og meira enn 100.000 tons í mun til 2007.

Útfluttu nøgdirnar hava sostatt ikki verið so lágar síðani seinnu helvt av 90'unum. Sambært hagtølunum stavar lækkingin serliga frá minni útflutningi av fiskamjøli, lodnu, og svartkjafti.

Hinvegin er nøgdin av laksi økt við 10.000 tonsum, av upsa við knapt 5.000, og av sild við knapt 4.000 tonsum.

Hóast stóru lækkingina í samlaðu útflutnings-nøgdini, er samlaða virðið av fiskaútflutningi-num í 2009 økt við umleið 90 mió. kr., ið svarar til eina hækking á umleið 2,5 prosent í mun til í 2008.

Samlaða útflutningsvirðið á fiskavørum í 2009 var 3,63 mia. kr., men í mun til 2008 eru fleiri forskjótingar millum ymisku fiskasløgini.

Dømi um hetta er m.a., at útflutningsvirðið á toski er minkað við 200 mió. kr. Hetta hóast nøgdin so at siga er óbroytt frá 2008 til 2009. Aðrar stórar virðislækkingarnar eru at síggja í útflutningum av hýsu og fiskamjøli, ið minkaðu við ávikavist 72 og 58 mió. kr. Hinvegin er útflutningsvirðið á laksi økt við 386 mió. kr. og á sílum við 37 mió. kr.

Sostatt er tað í stóran mun útflutningur av aldum fiski, ið heldur samlaða útflutningsvirðinum uppi. Tó so útflutningsvirðið á upsa og sild er hækkað við ávikavist 80 og 30 mió. kr.

Samlaða útflutningsnøgdin av frystum og køldum flaki, úr toski, hýsu og upsa, var umleið 1.000 tons størri í 2009 enn í 2008. Hinvegin var útflutningsvirðið av hesum vørum góðar 75 mió. kr. lægri í 2009. Størsta orsøkin til lækkaða virðið er, at prísurin á toskafløkum í miðal var góðar 15 kr lægri per kilo í 2009 enn í 2008. Hetta er ein lækking, ið svarar til næstan 37%, og sum við óbroyttari nøgd av toskafløkum merkti, at útflutningsvirðið minkaði við 90 mió.kr. Í hesum sambandi skal eisini havast í huga, at prísurin á toskafløkum longu lækkaði við 13% í 2008, og at miðalprísurin í 2009 tí ikki var meir enn gott helvtina av miðalprísinum í 2007.

Tað telur eisini skeiva vegin, at nøgdin av hýsufløkum er minkað við umleið 700 tonsum frá 2008 til 2009, samstundis sum miðalprísurin á hesum fløkum er lækkaður við umleið einum triðingi. Positiva vegin telur, at nøgdin av upsafløkum er hækkað við 1.500 tonsum, samstundis sum miðalprísurin í 2009 hækkaði við umleið 80 oyrum í mun til í 2008. Ávirkanin av hesum báðum broytingum var ein hækking í útflutningsvirðinum á 48 mió. kr.

Nøgdirnar av útfluttum saltfiski vóru á leið tær somu í 2009 sum í 2008. Tonsatalið hevur bæði árini ligið um gott 11.000 tons. Ein broyting millum fiskasløgini er tó hend, við tað at nøgdin av saltaðum toski er minkað við umleið 1.000 tonsum, meðan nøgdin av saltaðum upsa er hækkað við umleið 900 tonsum. Nøgdin av øðrum saltfiski, t.e. serliga longu og brosmu er hækkað við 200 tonsum.

Hóast samlaða nøgdin av saltfiski ikki broyttist nógv frá 2008 til 2009, er útflutningsvirðið minkað við næstan 120 mió.kr. Umframt minni nøgd av toski, er størsta orsøkin til hetta, at miðalprísurin á saltaðum toski var næstan ein fjórðing lægri í 2009. – Um enn í minni mun, telur tað eisini skeiva vegin, at miðalprísurin á øðrum saltfiski (t.e. brosmu og longu) var umleið 15 prosent lægri í 2009 enn í 2008.

Útfluttu nøgdirnar av frystum og feskum óvirkaðum fiski, eru øktust við á leið 3.000 tonsum í 2009. Tó er virðið á hesum útflutningi minkað við knøppum 40 mió.kr. í mun til í 2008.

## *Útlitini fyri fiskiveiðu og framleiðslu*

### Fiskiskapurin

Í grundgevingunum fyri sínum tilmæli til fiskiskapin undir Føroyum fyri fiskiárið 2010/2011 sigur Havstovan, at toskastovnurin á Føroyabanka framvegis er søguliga illa fyri, men at toskastovnurin á landgrunninum hinvegin er í vøkstri. Dentur verður tó lagdur á, at um nakar varandi bati skal spyrjast burtur úr tilgongdini, er umráðandi, at ungfiskurin fær frið at seta til. Um hýsustovnin verður sagt, at hesin framvegis er illa fyri og hevur alla vernd fyri neyðini. Lagt verður tó afturat, at 2009 árgangurin tykist at vera frægari enn tilgongdin seinastu mongu árini, men at hetta ikki sæst aftur í stovninum fyrr enn um 2-3 ár. Upsastovnurin er hampuliga væl fyri, og gýtingarstovnurin er mettur at vera oman fyri minst tilrádda markið hjá ICES.

Havstovan mælir til, at Føroyabanki framhaldandi verður stongdur fyri allari vinnuligari veiðu. Hetta er fyri at verja toskastovnin har, men fer eisini at koma hýsuni til góðar. Viðvíkjandi hýsuni sigur Havstovan, at rættast hevði verið at banna allari beinleiðis veiðu eftir hýsu, og at minka mest møguligt um hjáveiðu í øðrum fiskiskapum. Samstundis viðgongur Havstovan tó, at hetta er trupult, tí hýsa verður fyri tað mesta veidd í einum blandaðum línufiskiskapi eftir toski og hýsu, og toskastovnurin á landgrunninum er so væl fyri, at hann tolir ávísa roynd. Viðvíkjandi royndini eftir upsa hevur ICES mælt til at minka veiðutrýstið við 38%, men Havstovan metir ikki, at skerjingin nýtist at vera so stór sum ICES mælir til.

Yvirskipað mælir Havstovan til, at fiskidagatalið hjá skipabólkunum í dagaskipanini eigur at verða skorið við 25% av teimum tillutaðu døgunum í fiskiárinum 2009/2010, og at ein samsvarandi minking eigur at verða í royndini hjá lemmatrolarum. Leggjast skal til merkis, at tilmælti niðurskurðurin er í mun til tillutaðar dagar og ikki í mun til brúktar dagar. Í tilmælinum verður ikki beinleiðis sagt, hvussu niðurskurðurin eigur at javnast millum ymisku skipabólkarnar. Havandi í huga, at tilmæli leggur stóran dent á, hvussu umráðandi tað er at verja ungfiskin, er tó hugsandi at tað serliga í teimum veiðubólkum, ið troyta ungfiskin, at tørvur er á størst niðurskurði.

Tilmælið frá Havstovuni er júst latið fiskimálaráðharranum, og um somu tíð er fiskidaganevndin eisini komin við sínum tilmæli. Ein minniluti í fiskidaganevndini mælir til at minka fiskidagatalið í bólki 5B við 5.000 døgum, meðan restin av nevndini ikki heldur tað vera neyðugt við niðurskurði. Ein samd nevnd vísir tó á, at myndugleikarnir mugu halda vakið eyga við veiðuni eftir ungfiski.

Enn hevur fiskimálaráðharrin ikki tikið nakra avgerð um, hvat hann fer at mæla Løgtinginum til at samtykkja fyri komani fiskidagaár, ið byrjar 1. september. Í fjølmiðlunum hevur hann tó givið ábendingar um, at ætlanin er at hyggja nærri eftir talinum av tillutaðum døgum í bólki 5.

Hóast ávísar batar, mugu vit helst ásanna, at útlitini fyri fiskiskapinum eftir toski, og serliga hýsu, ikki eru nakað serlig fyri komandi fiskiár. Tað verður kortini ikki bannað at veiða hesi fiskasløg, og tí kunnu vit helst vænta, at veiðan av hýsu verður nakað tann sama sum í ár, meðan nøgdin av toski verður tann sama ella nakað størri. Hyggja vit longri fram, vísa framskrivingar hjá Havstovuni tó, at um tilmældu niðurskurðirnir í dagatali og aðrar tilmæltar reguleringar verða framdar, so fer hýsustovnurin at vaksa spakuliga aftur, og toskastovnurin á landgrunninum fer at koma upp um minstamarkið longu komandi ár. Upsastovnurin er framvegis hampuliga væl fyri, og tí er væntandi, at nøgdirnar av upsa verða tær somu, ella kanska heldur minni enn í ár. Onnur fiskasløg sum t.d. brosma og longa tykjast at vera rættuliga støðug, og sambært seinastu kanningunum hjá Magnus Heinasyni tykjast hesir stovnar framvegis at vera væl fyri. Hóast veiðan eftir gullaksi er nógv økt seinnu árini, tykist hesin stovnurin sambært Havstovuni framvegis at vera væl fyri.

## Marknaðirnir

Eins og 2008 var 2009 í nógvar mátar eitt

baldrut ár. Fíggjarkreppa og búskaparkreppa hava á ymiskan hátt havt ávirkan á arbeiðs-umstøðurnar. Millum annað gevur búskaparliga skrallið í Íslandi og tann nógv viknaða íslendska krónan okkara íslendsku kappingarneytum ein fyrimun.

Virðið á norsku krónuni er nú hækkað aftur, men bretska pundið hevur leingi verið lágt í mun til evruna og donsku krónuna, og hevur hetta negativa ávirkan á kappingarførið hjá føroyskum virkjum. Samstundis mugu vit ásanna, at keypiorkan hjá okkara kundum er hart rakt av gjaldføriskreppuni, ið hevur rakt so at siga allan heimin. Hetta hevur ikki minst verið galdandi fyri okkara týðandi marknaðir í Spania og Italia.

Samanumtikið kann sigast, at 2010 sær út til at gerast enn eitt avbjóðandi ár fyri føroysku fiskivinnuna. Ábendingar eru um, at støðan á heimsmarknaðunum so líðandi er við at gerast betri, og tískil kann væntast, at glið aftur fer at koma á søluna. Vónandi merkir hetta eisini, at prísirnir samstundis kvinka upp eftir.

## *Alivinna*

Alivinnan er væl fyri, og úrslitini seinastu árini hava verið góð. Seinastu árini hava tað verið seks feløg, sum standa fyri alivirkseminum í Føroyum. Harafturat er Fiskaaling, sum rekur royndarvirksemi innan aling. Karmarnir um alivinnuna eru góðir, og hevur alivinnan ein skynsaman rakstur, har neyv framleiðslu-stýring er.

Bygt á góðar karmar og nærlagni er alivinnan í dag burðardygg. Hetta sæst aftur, tí fiskurin veksur væl og hevur sera lágt fellið, samanborið við størstu kappingarneytarnar í Noregi og Kili. Saman við góðum marknaðarprísum hevur hetta gjørt, at alivinnan hevur gott avkast í 2009.

Meðan framleiðslan í 2006 og 2007 varð eyðkend fyri, at sera lítið var av fiski, var framleidda nøgdin av laksi og sílum í 2009 knøpp 60.000 tons í rundari vekt. Samlaða útflutningsvirðið frá alivinnuni í 2009 var góðar 1,3 mia. kr.




| | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Síl | 0,915 | 1,44 | 1,26 | 3,292 | 1,315 | 3,335 | 11,149 | 10,22 | 5,092 | 4,493 | 5,496 | 7,648 | 8,943 | 7,645 |
| Laksur | 17,663 | 20,306 | 19,176 | 39,252 | 33,508 | 53,557 | 44,954 | 61,63 | 40,985 | 18,962 | 13,078 | 22,305 | 38,494 | 51,214 |

Samanumtikið hevur 2009 verið eitt gott ár, og sigast kann, at alivinnan er komin uppaftur á eina burðardygga og stabila framleiðslunøgd.

Í ár verður mett, at tøkan verður eini 15 % minni enn í 2009. Orsøkin er, at nógvur fiskur varð tikin í 2009, og útsetingarnar av smolti eru ikki øktar seinnu árini. Í 2010 verður mett, at nakað væl meira av smolti verður sett á sjógv, og tískil fer framleiðslan av laksi komandi árini at vaksa eini 5% um árið.

Í 2007 øktist útboðið av laksi á evropeiska marknaðinum, og var tá eitt trýst á laksaprísin. Í 2008 var gongdin á leið tann sama. Lági kursurin á norski krónuni gjørdi, at laksaprísurin til føroyska alaran eitt tíðarskeið seint í 2008 var ájavnur við framleiðsluprísin. Í 2009 hækkaði marknaðarprísurin heilt fitt, samstundis sum kursurin á norsku krónuni eisini hækkaði aftur.

Lági flutningsprísurin á flogfrakt yvir um atlantshavið hevur verið ein viðvirkandi orsøk til, at hetta hevur latið seg gjørt. Hvussu leingi lágu flutningsprísirnir standa við er tó óvist, og ein hækking í flutningsprísunum kann verða við til, at hetta mynstrið broytist aftur. Føroyska alivinnan hevur nýtt hetta høvi at gera seg galdandi á amerikanska marknaðinum, og hevur hetta eydnast væl.

Útlitini fyri komandi árið eru góð, men tað er torført at meta um, hvussu gongdin verður í 2011 og framyvir.

Alisøgan sigur okkum, at prísurin kann sveiggja sera nógv, men roknað verður við, at um alarar hava ein burðardyggan rakstur og fyribyrgja sjúku, skuldi alivinnan megna at liva við teimum príssveiggjum, sum fara at koma.

Seinastu árini eru royndir gjørdar við at ala tosk. Fiskaaling framleiddi toskayngul, og tvær alifyritøkur settu tosk út til framleiðslu. Allur fiskurin er nú tikin, og samanumtikið kann sigast, at framleiðslan gekk væl. Fiskurin vaks serstakliga gott og munandi betri enn toskur hjá okkara kappingarneytum. Lønsemi í framleiðsluni hevur tó ikki verið nøktandi, og fallandi marknaðarprísir hava gjørt sítt til, at henda aling ikki loysir seg. Eingin aling av toski fer tí fram í løtuni.

# *Handverksvinnan*

## Gongdin í handverksvinnuni

Til tess at lýsa gongdina í handverksvinnuni verður fyrst hugt eftir lønargjaldingum í ymiskum handverksvinnum.

Talvan niðanfyri vísir gongdina í lønarútgjaldingum innan handverksvinnuna. Her sæst, at útgoldnu lønirnar eru lækkaðar úr 956 mió. kr. í 2008 til 818 mió. kr. í 2009. Hetta er ein rættuliga ógvuslig lækking, ið svarar til 14,5%. Samanborið við lækkingina í samlaðu lønargjaldingunum í 2009 á 4,5%, var afturgongdin í handverksvinnuni sostatt nógv størri. Úrslitið av hesum er, at handverksparturin av samlaðu lønargjaldingunum er minkaður nakað og svaraði í 2009 til 12,2% í mun til 13,6% í 2008.

Um hugt verður eftir løntakarum heldur enn lønargjaldingum, er byggivinnan sambært upplýsingum frá Hagstovuni, minkað við 20% seinastu tvey árini.

Hetta er størsta minking síðan 1989. Byggivinnan var uppá tað største í 1988/89, tá fleiri enn 4.000 løntakarar vóru. Frá 1989 til 1994 minkaði byggivinnan við meira enn eini helvt, men síðan tá hevur tað verið ein javnur vøkstur. Frá 2008 er vinnan tó minkað aftur, og seinastu tvey árini eru løntakararnir í byggivinnuni vorðnir 20% færri.

| Vinnugrein | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Skipasmiðjur, smiðjur | 130,9 | 122,7 | 124,9 | 139,2 | 161,4 | 162,0 | 131,8 |
| Ídnaður annars | 223,9 | 217,7 | 223,8 | 234,1 | 249,0 | 252,3 | 236,6 |
| Bygging | 344,3 | 397,1 | 392,6 | 455,3 | 511,4 | 542,0 | 449,3 |
| *Tilsamans* | **699,1** | **737,5** | **741,3** | **828,7** | **921,8** | **956,3** | **817,7** |
| **% av samlaðum lønargjaldingum** | 12,1% | 12,6% | 12,4% | 12,9% | 13,3% | 13,6% | 12,2% |
| % vøkstur í lønargj, handverksvinnan | 1,2% | 5,5% | 0,5% | 11,8% | 11,2% | 3,7% | -14,5% |

Myndin niðanfyri vísir innflutningin av tilfari og lutum til byggivinnuna frá 2000 til 2009. Tey fyrstu árini var innflutningurin rættuliga støðugur og lá millum 300 og 400 mió. Í 2006 hækkaði innflutningurin tó við næstan 22%, og í 2007 hækkaði hann við heili 36%, soleiðis at innflutningurin til byggivinnuna í 2007 var heilar 618 mió. kr.

At ein partur av hesum vøkstri óivað stavaði frá øktum byggivirksemi, kunnu vit grundað á vøksturin í lønargjaldingum, sum henda vinna hevði í sama tíðarskeiði. Hinvegin er einki at ivast í, at stóri vøksturin eisini var grundaður á eina príshækking á teimum vørum, ið vórðu innfluttar til nýtslu í byggivinnuni.

Síðani 2007 er gongdin tó vend munandi. Í 2008 lækkaði virðið á innflutninginum við góðum 11%, og í 2009 við heili 36%, soleiðis at innflutningurin kom niður á knappar 350 mió.kr. Í áljóðandi virði svarar hetta til støðið í 2001, men um vit taka hædd fyri prísgongdini, so er støðið í 2009 tó væl niðanfyri tað í 2001.




Í 2008 kom talið av nýbygdum sethúsum niður aftur á 225, sum er ein munandi afturgongd í mun til tey 357 húsini, ið vórðu bygd í 2007. Hetta eru tó framvegis væl fleiri enn tey gott hálvtannaðhundrað sethúsini, ið árliga vóru bygd í tíðarskeiðnum 2001 til 2006. Í so máta var støðið í 2008 tí framvegis høgt.

Roknast kann við, at bygdu eindirnar hava verið færri í 2009, men tíverri eru ongar upplýsingar tøkar um hetta enn.

## Útlit fyri handverksvinnuna

Bæði landsstýrið og kommunurnar hava seinnu árini hildið ein lutfalsliga javnan íløgukarm. Hesa gondina hevur byggivinnan verið fegin um, tí at tað er av stórum týdningi fyri vinnuna, at bygging og viðlíkahaldsarbeiði hjá tí almenna verður hildið á einum jøvnum støði. Samstundis er hetta ein trygging móti alt ov stórum sveiggjum í samfelagnum, og ger tí búskapargongdina tryggari. Tá privata virksemið so eisini tók dik á seg, máttu vit tó ásanna, at samlaða virksemið í landinum at enda hevði hug at gerast í meira lagi í mun til ta arbeiðsstyrki, sum handverksvinnan hevði møguleika at fáa hendur á. Úrslitið varð fløskuhálsar og lønarglíðing, og tað gagnaði hvørki handverksvinnuni ella samfelagnum annars, og tí var ynskiligt við størri javnvág í samlaða virkseminum hjá tí almenna og tí privata.

Umstøðurnar broyttust tó skjótt, tá heimsumfatandi fíggjar- og búskaparkreppan fór at gera um seg. Hetta hevur m.a. sæst aftur í at privata byggingin er nógv minkað. Tí er tað nú aftur av størsta týdningi, at bygging og viðlíkahaldsarbeiði hjá landi og kommunum er við til at halda virkseminum á einum rímuligum støði.

Tíverri hevur tað tó higartil ikki víst seg, at hesir aktørarnir, ið eiga at virka stabiliserandi, hava megna at lyft hesa uppgávu í nóg stóran mun. Samstundis hava feløg og persónar við ætlanum um bygging ella umvæling í stóran mun leingi verið í einari bíðistøðu, lutvíst tí tey kanska ikki hava fingið fígging, men eisini tí tey ikki hava vilja ella tora at brúkt av sínum gjaldføri. Ábendingar eru um, at henda støðan spakuliga er við at broytast, og vónir eru tí um, at eftirspurningurin í handverksvinnuni so smátt fer at vaksa aftur. Yvirskipað kann tó ikki roknast við, at nøkur broyting til tað betra verður at síggja í 2010, men vónandi verður tað øðrvísi í 2011.

## *KT-vinnan*

Tað seinasta árið hevur verið merkt av fíggjarkreppu og nógvum kjaki um, hvørjar avbjóðingar kreppan hevur við sær, og hvørji stig skulu takast. Í hesum sambandi hevur KT-felagið víst á sína áskoðan í fjølmiðlum. Júst í hesum krepputíðum skuldu verið góðir møguleikar fyri KT-vinnuna at hjálpt til við at loyst rationaliseringsuppgávur, bæði fyri alment og privat vinnulív.

Ein konsolidering hevur verið í KT-vinnuni tey seinnu árini, og er tað hugaligt at síggja, at tað um somu tíð spretta fram nýggj minni virki, sum vaksa seg størri og trívast. Vegna væntandi hagtalsgrundarlag er torført at vísa á ein konkretan vøkstur ella fall, men afturmeldingarnar frá vinnuni eru, at virksemið hevur verið á leið tað sama í 2009 sum í 2008.

Hetta hevur eisini ført við sær, at nakrar uppsagnir hava verið neyðugar.

KT-vinnan hevur seinnu árini arbeitt miðvíst við, at tiltøkini, ið vóru løgd fram í eini KT-strategi, verða gjøgnumførd. Serliga hevur fokus verið á at fáa gongd á eina KT-útbúgving á Setrinum, og er hetta eydnast.

## *Samskiftisvinnan*

Búskaparkreppan, sum alheims fíggjarkreppan hevur elvt til, hevur eisini merkt føroysku samskiftis- og lýsingarvinnuna.

Í stuttum kann sigast, at tað framvegis eru tveir stórir veitarar á marknaðinum saman við eina vaksandi tali av minni veitarum. Vegna væntandi hagtalsgrundarlag er torført at vísa á ein ítøkiligan vøkstur ella fall, men afturmeldingarnar frá vinnuni eru, at virksemið hevur verið nakað lakari í 2009 enn í 2008. Hetta hevur eisini ført við sær, at uppsagnir hava verið neyðugar, og at fyritøkurnareisini hava tillagað virksemi til broyttu umstøðurnar.

Eftirspurningurin eftir tænastum frá hesi vinnugrein hevur eisini flutt seg nakað. Kundarnir ynskja nú meira ráðgeving, heldur enn at lata samskiftisfyritøkurnar standa fyri vanligari lýsingaframleiðslu Hóast hetta hevur vinnugreinin sum heild havt nøktandi virksemi og úrslit, og mett verður, at 2010 fer at gerast eitt rímiligt ár.

## *Ferðavinnan*

Ferðavinnan hevur leingi verið eitt boð uppá eitt av teimum “nýggju beinunum”, sum skal bera føroyska búskapin. Hóast ferðavinnan í Føroyum helst er økt nakað hesi seinnu árini, er kortini ringt at gera hetta upp ella ávísa hetta ítøkiligt. Ymiskar orsøkir eru til hetta, men tær flestu kunnu kortini bólkast undir eitt felagsheiti, ið er manglandi hagtøl.

Ofta er torført at skilja ímillum, hvat hoyrir undir ferðavinnu, og hvat hoyrir undir aðrar vinnur. Hagtøl verða t.d. skrásett fyri millumlanda flutning av ferðafólki loft- og sjóvegis, men eingin skilnaður er t.d. ímillum, hvussu nógv av hesum er ferðavinna, og hvussu nógv er arbeiðsørindi. Skilt verður heldur ikki í millum, hvussu stórur partur eru útlendsk ferðafólk, ið koma til Føroyar, og hvussu stórur partur eru føroysk ferðandi, ið fara uttanlands. Hagtølini yvir ferðandi vísa annars, at loftvegis komu knapt 102.000 ferðandi til landið í 2009, meðan gott 28.000 komu sjóvegis. Í báðum førum er talan um eina lækking í mun til 2008, tá tølini vóru ávikavist gott 111.000 og gott 32.000.

Eingi almenn hagtøl finnast heldur fyri gistingar, men gistingarhúsini fylgja, hvør í sínum lagi, við hesari gongdini. Út frá hesum vita vit, at talið av gistingum er líðandi minkað hesi seinnu árini; eisini áðrenn vit fingu eina alheims fíggjar- og búskaparkreppu. Ábendingar eru tó um, at henda gongdin møguliga fer at venda í 2010.

Orsakað av manglandi hagtølunum, ber samanumtikið illa til at siga nakað ítøkiligt um samlaðu gongdina í føroyskari ferðavinnu. Vit kunnu tó fegnast um, at tað alla tíðina eru spírar at hóma í ferðavinnuni, og at tað nærum á hvørjum ári verða ment ymisk nýggj tilboð til ferðandi í Føroyum. Hinvegin kann spurnartekin setast við, hvussu leingi hesi tilboð eru á marknaðinum, um tað ikki eydnast at fáa talið av ferðafólki at vaksa.

Í 2008 tóku fleiri feløg, sum burturav ella partvís arbeiða við ferðavinnu, stig til at stovna Ferðavinnufelagið, ið ætlandi skal fáa ein savnandi leiklut fyri tey, ið eru vinnuliga virkin í ferðavinnuni. Felagið hevur nú sett fólk at taka sær av uppgávum fyri

ferðavinnuna, í Vónandi fer hetta at roynast væl, og vónandi megnar felagið at byggja víðari á hesa grundina.

Í løtuni eru útlitini ikki tey bestu fyri fíggjarligari framgongd í ferðavinnuni. Henda meting byggir serliga á truplu tíðirnar, ið flestu lond á okkara leiðum merkja sviðan av í dag. Tað hevur verið trupult at fáa útlendsk ferðafólk at keypa ferðaseðil til Føroya, og hetta merkist sjálvandi aftur í øðrum pørtum av ferðavinnuni. Ábendingar eru tó um, at henda støðan er við at gerast betri. Vit plaga eisini at siga, at tá búskaparútlitini ikki eru so góð, ferðast fólk vanliga meira í egnum landi.

Tí er væntandi, at tann parturin av ferðavinnuni, ið megnar at selja síni tilboð til føroyingar, hevur møguleika at klára seg væl í hesum tíðum.

Ferðavinnan er framvegis ein lutfalsliga nýggj vinna í Føroyum og avmarkað er, hvussu væl hon megnar at gera vart við seg sjálva, bæði heima og uttanlands. Einstøku fyritøkurnar hava sjálvdan fíggjarliga megi til munadygga marknaðarføring, og tí er ringt at fáa eyga á nakra veruliga “branding” av føroysku ferðavinnuni. Nakrar royndir eru gjørdar at samstarva um marknaðarføring, men framvegis munar hetta ov lítið í tí stóra høpinum. Nakað verður eisini gjørt frá almennari síðu, men eisini hetta tykist at gera ov lítlan mun. Ásannast má, at fíggjarliga orkan hjá landi og fyritøkum ikki er stór, og tí er neyðugt, at marknaðarføringin av Føroyum sum ferðamannaland verður meira miðvís enn higartil. Arbeitt hevur verið við hesari avbjóðing, millum annað við at finna fram til ein kappingarsamleika fyri Føroyar, og við størri samskipan millum privat og almenn átøk. Vit vita, at neyðugt er við áhaldandi marknaðarføring, men vit vita eisini, at tað kostar at marknaðarføra. Fyri at náa góðum úrslitum, er tí neyðugt, at avvarandi myndugleikar eru til reiðar at marknaðarføra á ein slíkan hátt, at tað munar.

Ein treyt fyri at kunna arbeiða meira miðvíst er eisini, at tað finst haldgott hagtalsgrundarlag til at byggja avgerðir á. Frá almennari síðu er nakað av peningi játtaður til hetta øki, og nakað av arbeiði er eisini gjørt, men enn manglar okkum at síggja munagóð úrslit av hesum. Mælt verður tí til, at endin ikki verður sleptur á hesum arbeiði, men at tað verður fylgt upp og leypandi ment og hildið við líka. Í hesum sambandi kann eisini nevnast, at ein av uppgávunum í nýggja verkætlanarstarvinum hjá Ferðavinnufelagnum, júst verður at arbeiða við at fáa betri hagtalsgrundarlag til vega á ymiskum økjum.

## *Handilsvinnan*

Handilsvinnan og aðrar vinnur hava merkt stórar avbjóðingar seinastu árini. Serliga eru tað fyritøkurnar, sum selja drúgvar vørur, s.s. bilar, møblar, hvítvørur, sum hava merkt afturgongd, meðan matvøruvinnan, sum selur ódrúgvar vørur, ikki í sama mun hevur merkt til fallandi sølu.

Størsta avbjóðingin hjá handilsvinnuni hevur verið at halda útreiðslustøðinum niðri, samstundis sum roynt hevur verið at hildi søluni uppi. Gongdin seinastu tvey árini hevur verið, at fleiri kundar keypa fleiri vørur á tilboð, og tískil gerst bruttovinningurin minni.

Somuleiðis eru marknaðarpartarnir hjá handilsfyritøkunum broyttir. Hetta er orsakað av, at kundar er meira tilvitaður um nýtslu av peninginum og hava tí flutt seg frá at keypa í teimum dýraru handlunum til at keypa meira frá teimum handlum, sum eru kendir fyri at hava lægri prísir.

Handilsvinnan hevur ikki havt trupulleikar við gjaldførinum, og er hetta orsakað av, at søla uppá kredit sum meginregla ikki verður loyvd. Somuleiðis eru goymslurnar minkaðar munandi.

Bilasølan er vanliga eitt gott mát fyri, hvussu kundin uppfatar búskaparstøðuna. Um hugt verður eftir bilasøluni seinnu árini sæst, at í 2009 vóru munandi færri bilar seldir.

Ábendingar eru um, at bilasølan er við at taka seg uppaftur, og lata bilasølurnar frægari at í ár

enn undanfarna ár. Higartil í 2010 er 519 nýggir bilar skrásettir í Føroyum.

## Ódrúgvar vørur – matvøruvinnan

Flestu matvørufyritøkur hava merkt ein marginalt øktan umsetning í 2009 í mun til 2008. Generelt er talan um eitt søluindeks millum 100-105 í 2009. Innkeypsprísirnir hækkaðu í 2008 og nakað inn í 2009, og hevur hetta elvt til eina minking í bruttovinninginum hjá fyritøkunum. Rationaliseringar hava gjørt, at tað eisini innan matvøruhandilsvinnu er ein minking av lønarútreiðslunum, orsakað av at fleiri ársverk eru spard burtur. Hetta hevur havt við sær, at hesin parturin av handilsvinnuni eftir umstøðunum hevði nøktandi úrslit í 2009. Flestu fyritøkurnar vænta eina lítla framgongd í søluni svarandi til millum indeks 100 til 105 í 2010.

Talvan niðanfyri vísir, at innflutningurin er minkaður við 3,8 prosentum, svarandi til 29 mió. kr frá 2008 til 2009.

| Matvøruvinnan – detail | 2008 | 2009 | Munur | % |
|---|---|---|---|---|
| Matur, drykkjuvørur og tubbak | 511.429 | 501.933 | -9.496 | -1,9% |
| Aðrar ódrúgvar nýtsluvørur | 261.058 | 241.456 | -19.603 | -7,5% |
| **í alt** | **772.488** | **743.389** | **-29.099** | **-3,8%** |

## Drúgvar vørur - møblar, hvítvørur, v.m.

Flestu virkir hava merkt ein lægri umsetning í 2009 samanborið við 2008. Generelt er talan um eitt søluindeks millum 70-100 í 2009, sum er ein minking uppá upp til 30% í mun til 2008. Hetta hevur sjálvsagt minka munandi um bruttovinningin hjá vinnugreinini.

At kalla øll virkir hava tálmað um útreiðslustøði á øllum økjum.

Marknaðarføringsútreiðslurnar eru skornar nógv, og lønarútreiðslurnar eru eisini minkaðar nógv. Tískil eru fleiri ársverk eru spard burtur í hesum partinum av handilsvinnuni.

Sambært fyritøkunum, hevur tað, tey seinnu árini verið stórt fokus á at minka um útreiðslustøðið og sæst hetta aftur í eftir umstøðunum nøktandi ársúrslitum.

Teir fyrstu mánaðirnir í 2010 hava gingið hampuliga væl.

Sambært fyritøkunum er marknaðurin tó enn óstøðugur, og tað er tískil torført at meta um, um niðurgongdin hevur stabiliserað seg ella ikki. Flestu fyritøkurnar vænta eina lítla framgongd í søluni svarandi til millum indeks 100 til 105 í 2010 í mun til 2009.

Sum tað framgongur av niðanfyristandandi talvu, er innflutningurin minkaður við 19,5 prosentum, svarandi til 74 mió. kr í 2009 í mun til 2008.

| Møblar til sethús, skrivstovur | 2008 | 2009 | Munur | % |
|---|---|---|---|---|
| Aðrar hálvdrúgvar nýtsluvørur (kuffert, plastikvørur, toilettaskur vm) | 199.804 | 167.056 | -32.748 | -16,4% |
| Aðrar drúgvar nýtsluvørur (møblar køliskap hvítvørur vm. ) | 182.948 | 141.157 | -41.791 | -22,8% |
| **Í alt** | **382.752** | **308.213** | **-74.539** | **-19,5%** |

## *Oljuvinnan*

Síðani stóra fallið í oljuprísunum í 2008, hevur gongdin í vinnuni verið óstøðug. Tað sær tó nakað betur út nú, og vinnan hevur gott treysti.

Tó fer stóra oljudálkingin í Meksikanska Golfinum helst at ávirka oljuleitingar framyvir. Tað er ikki óhugsandi, at trygdarkrøvini verða

herd, bæði í mun til útgerð og mannagongdir. Serliga kann tað hugsast at fara at ávirka boringar á djúpum vatni. Enn er tó ómøguligt at siga, hvussu gongdin verður.

Eftir ætlan skuldi ENI byrja eina oljuboring í føroyskum øki á sumri í 2009. Men boripallurin West Phoenix, sum nýtast skuldi, var ikki tøkur, og boringin varð tí útsett. Henda boring fer væntandi at byrja um mánaðarskifti juni-juli og er ætlað at taka 75-80 dagar.

Føroysku fyritøkurnar Atlantic Supply Base og Atlantic Airways hava fingið avtalu um veitingar til boringina. Harafturat fara fleiri aðrar føroyskar fyritøkur helst at fáa smærri uppgávur í sambandi við boringina og fyrireikingar av hesi.

At føroyskar fyritøkur eru aktivar í sambandi við boringar er av stórum týdningi, tá hugsað verður um at menna fyritøkurnar. Tað hevur tí týdning, at tað framhaldandi verður virkað fyri, at føroyskar fyritøkur varðveita henda møguleika. Her kann nevnast ásetingin um kaikantin í føroysku oljulóggávuni. Møguliga skal henda áseting endurskoðast, men tað er grundleggjandi fyri ein føroyska vinnu, sum er tengd at oljuvirkseminum, at henda regla ikki verður tikin burtur.

Í ársfrágreiðingini í fjør varð nevnt, at nú oljuleiting er farin fram í Føroyum í nøkur ár, átti lóggávuverkið og praksis rundanum oljuleiting og oljuvirksemi í Føroyum at verið eftirmett. Vinnan metir framvegis, at hetta hevði verið skilagott og mælir til, at eitt framhald av arbeiðinum hjá Oljuráðleggingar-nevndini verður skipað, har eisini vinnan verður tikin við uppá ráð.

## *Fíggjarvinna*

Í september 2008 var gjaldføriskreppa í fíggjarsektorinum kring allan heim. Í kjalarvørrinum av teirri sonevndu Sub Prime-kreppuni í USA, komu nógv tap undan kavi í amerikonskum og evropeiskum bankum. Hetta hevði við sær, at álitið millum bankar at kalla hvarv, og tískil vildu hesir ikki læna pening millum sín eins og áður. Tí frystu flestu gjaldførisstreymarnir millum bankarnar, og ein gjaldføriskreppa gjørdist veruleiki.

Í einari óvanligari tíð við óvanligari órógv á fíggjarmarknaðunum og kreppu í heims-búskapinum, mettu politikarar um allan heim tað vera neyðugt at skapa stabilitet í fíggjar- og bankakervinum, og soleiðis skapa tryggleika fyri kundan. Í hesum sambandi samtykti danska Fólkatingið bankapakka I í oktober 2008, og síðani bankapakka II í januar 2009. Eftirfylgjandi gjørdi Føroya Løgting tað sama.

Saman við einari røð av donskum bankum hava teir føroysku peningastovnarnir gjørt av at vera við í bankapakka I. Hetta varð gjørt til tess at tryggja innlánini hjá kundunum í føroysku peningastovnunum.

Føroysku peningastovnarnir hava harumframt tikið lut í bankapakka II, og kunnu fram til 30. juni 2010 veita lán ella lánsbrøv uppí 3 ár við ríkisveðhaldi. Við bankapakka II fingu peningastovnarnir eisini møguleika til at lána hybridan kjarnukapital.

Í mai 2010 samtykti Løgtingið at broyta ásetingarnar um innskjótaratrygd, soleiðis at innlán í føroyskum peningastovnunum eru eins væl tryggjaði sum innlán í donskum peningastovnum. Broytingin merkti, at markið fyri trygging av nettoinnlánum varð hækkað úr 300.000 kr. upp í 100.000 evrur, svarandi til umleið 750.000 kr.

Fram til 30. september 2010 eru øll innlán fevnd av Bankapakka I við veðhaldi í danska statskassanum uttan mun til,hvussu stór upphæddin er. Eftir henda dag verður tryggjaða upphæddin 100.000 evrur, svarandi til umleið 750.000 kr.

Føroysku peningastovnarnar hava havt misjøvn úrslit seinastu árini. Óstabiliteturin á fíggjarmarknaðunum hevur ávirka peningastovnarnar ymiskt. Tó eru tekin um, at brotasjógvarnir nú eru minni.

Talvan niðanfyri vísir inn- og útlánini í føroysku peningastovnunum. Innlánini eru økt við 76 mió. kr, meðan útlánini eru minkaði við 133 mió. kr.

| Mió. DKK | des-03 | des-04 | des-05 | des-06 | des-07 | des-08 | des-09 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Innlán** | **8.789** | **9.007** | **10.206** | **12.019** | **13.696** | **14.462** | **14.538** |
| **Útlán** | **9.517** | **9.709** | **10.594** | **12.994** | **18.556** | **19.012** | **18.879** |

Umlegging frá bankalánum til realkredittlán til bústaðarfígging er ein partur av frágreiðingini upp á, at útlánini hjá peningastovnunum eru minkaði í 2009. Ein onnur orsøk er, at fólk og fyritøkur eru meira varðin at gera íløgur og spara heldur upp. Hetta er eisini í trá við gongdina sum heild í samfelagnum.

Rentustøðið er lækkað nakað seinastu tíðina orsaka av búskaparútlitunum Roknað verður tó ikki við, at rentan lækkar nógv afturat í ár.

Mett verður, at útlánini hjá peningastovnunum ikki fara at vaksa meira enn 0-5 % í hesum árinum. Lægri vøksturin kemst av, at virksemi í samfelagnum er minkað og hugurin at gera íløgur er minnið. Sjálvt um úrslitini hjá fyritøkum sum heild hava verið verri seinastu árini, og arbeiðsloysið er vaksið, eru eftirstøðurnar hjá peningastovnunum ikki vaksnar nevnivert. Hetta er gevur eina ábending um at tað kortini ikki stendur so illa til hjá vinnuni og húsarhaldunum.

## *Tryggingarvinnan*

Tryggingarfeløgini hava havt øktar inntøkur. Søluindeksið liggur millum 100 til 115. Hetta kemst fyri stóran part av, at talan hevur verið um príshækkingar. Nýggja vanlukku-trygginarlógin hevur havt við sær størri endurgjaldsásetingar, og eru tryggingargjøldini tískil eisini økt. Talið av teknaðum tryggingum seinasta árið í mun til undanfarna ár, er stórt sæð óbroytt.

Sambært skaðatryggingarfeløgnum, eru rakstrarútreiðslurnar hjá feløgunum tálmaðar nakað. KT-útreiðslurnar eru minkaðar og starvsfólkatalið, sum longu varð tillagað í 2008, er ikki tillagað meira í 2009. Skaðaendurgjøldini hava verið lág í 2009 samanborið við tvey tey seinastu árini, eins og vanligt er, tá minni virksemi og ferð er á búskapinum.

## *Shippingvinnan*

Árið í fjør var fyrsta árið, har nýggja FAS-skipanin veruliga fór at virka. Tað sær út til at skipanin hevur undirtøku frá reiðaríunum, eisini teimum útlendsku. Um hesa tíðina í fjør vóru 33 skip skrásett í skipanini, og nú eru 46 skip skrásett. Afturat hesum er stórur áhugi fyri at skráseta skip undir FAS, so helst fer talið av skipum at økjast munandi.

Broytta skipanin hevur nú virkað eina tíð, men enn eru smávegis ítøkiligir trupulleikar, sum mugu fáast uppá pláss. Eisini er neyðugt fyri framhaldandi at hava eina dygdargóða skipan, at tikið verður hædd fyri henni í allari løggávu, sum kann ávirka hana.

Reiðarafelagið fyri Farmaskip hevur eisini merkt økta virksemi av fleiri skipum undir føroyskum flaggi. Serliga er tað í sambandi við sáttmálaviðurskifti hjá manningum við hesum reiðaríum, og hetta gevur felagnum nýggjar avbjóðingar.

Landsstýrismaðurin í vinnumálum setti fyrr í ár arbeiðsbólk at orða ein sjóvinnupolitikk, serliga við atlitið at handilsflotanum. Hesin

bólkur er í ferð við at leggja seinastu hond á arbeiði, og vónandi verður hetta eitt amboð hjá politikarum, fyrisiting og vinnu, soleiðis at tryggjaður verður ein langsigtaður karmur um hesa vinnu. At tær treytir, vinnan arbeiðir undir, eru greiðar og gjøgnumskygdar er avgerandi fyri, at føroysk shippingvinna mennir seg, og soleiðis kann gerast ein av hornasteinunum í føroyska búskapinum.

## Um Føroya Arbeiðsgevarafelag, Vinnuhúsið og feløgini annars

Føroya Arbeiðsgevarafelag er meginfelag fyri føroyskar arbeiðsgevarar. Felagið arbeiðir fyri, at føroykst vinnulív hevur teir bestu møguleikarnar fyri at kappast, mennast og virka. Við samráðingum og sáttmálum tryggjar Arbeiðsgevarafelagið samstundis góðar og støðugar arbeiðsmarknaðarkarmar fyri vinnuna.

Í Føroya Arbeiðsgevarafelag eru føroyskar fyritøkur limir, umframt at arbeiðsgevara-samskipanir eru limir í felagnum. Arbeiðs-gevarasamskipanirnar eru Føroya Handverks-meistarafelag, Føroya Prentsmiðjufelag, Arbeiðsgevarafelagið hjá Fíggjarstovnum í Føroyum og Reiðarafelagið fyri Farmaskip.

Endamálið hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag er at arbeiða fyri:

- **Felags sáttmálum fyri vinnuna:** Vegna vinnuna ger Arbeiðsgevarafelagið sáttmálar við løntakarafeløgini, ið tryggja støðug viðurskifti á arbeiðsmarknaðinum og tálma lønarvøkstur í mestan mun.
- **Vinnupolitiskum kørmum:** Vegna vinnuna verður arbeitt við, at ávirka allar lógir, kunngerðir og ásetingar annars, sum landsstýri, løgting, umsiting, stovnar og kommunur seta í verk, soleiðis at hesar tæna og ikki darva vinnuni. Vinnufeløgini eru m.a. umboðaði í nógvum ymiskum nevndum, ið seta karmar fyri føroyska samfelagið og framtíð okkara.
- **Kunning:** Arbeiðsgevarafelagið veitir kunning um privatu vinnuna, vinnulig viðurskifti og tann týdning, vinnan hevur fyri samfelagið, bæði beinleiðis og gjøgnum føroyskar miðlar.
- **Ráðgeving og tænasta:** Felagið veitir limum sínum ráðgeving og tænastur á ymiskum økjum: starvsfólkaviðurskifti og leiðsla, sáttmálar, lógir og reglugerðir á vinnuøkinum v.m. Eisini virkar umsitingin í Vinnuhúsinum sum sambindingarlið við vinnu í øðrum londum.
- **Fundir og orðaskifti fyri leiðslurnar innan vinnuna:** Felagið hevur átikið sær leiklutin at vera miðdepil fyri vinnuligum og vinnupolitiskum orðaskifti. Skipað verður fyri ymiskum tiltøkum, har bond verða knýtt millum leiðarar í privatu vinnuni - eisini tá húsið er karmur um vitjanir uttaneftir.

Lógir og virðisgrundarlagið hjá felagnum eru lýst á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo.

Føroya Arbeiðsgevarafelag eigur Vinnuhúsið saman við Havnar Handverksmeistarafelag. Føroya Arbeiðsgevarafelag stendur fyri rak-strinum av Vinnuhúsinum. Vinnuhúsið er felags marknaðarføringsheitið á virkseminum hjá arbeiðsgevarafeløgunum og vinnugreina-feløgunum, sum húsast saman í Vinnu-húsinum.

## *Hvør húsast í Vinnuhúsinum?*

Í dag eru 18 feløg undir sama taki í Vinnuhúsinum. Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur ta hugsan, at tað hevur týdnng at savna føroyska vinnu undir einum taki. Hetta fyri at vinnan skal fáa størri styrkið.

Arbeiðsgevarafeløgini eru:

| Arbeiðsgevarafeløg | Ábyrgd |
|---|---|
| Føroya Arbeiðsgevarafelag | Marita Rasmussen |
| Føroya Handverksmeistarafelag (íroknað Havnar Handverksmeistarafelag) | Egon Joensen |
| Arbeiðsgevarafelagið hjá Fíggjarstovnum í Føroyum | Esther Dahl |
| Føroya Prentsmiðjufelag | Esther Dahl |
| Reiðarafelagið fyri Farmaskip | Esther Dahl |

Høvuðsuppgávan hjá Arbeiðsgevarafeløgunum er at føra sáttmálasamráðingar við fakfeløgini vegna limirnar og at ráðgeva limunum í sáttmálaspurningum.

Harafturat arbeiða arbeiðsgevarafeløgini eisini við arbeiðsmarknaðarmálum og yvirskipaðum vinnukørmum.

Vinnugreinafeløgini eru:

| Vinnugreinafeløg | Ábyrgd |
|---|---|
| Havbúnaðarfelagið | Marita Rasmussen |
| Føroya Ráfiskakeyparafelag | Egon Joensen |
| Føroya Keypmannafelag | Mikkjal Joensen |
| Felagið Laksaskip | Egon Joensen |
| KT-felagið | Gordon Rajani |
| Oljuvinnufelagið | Esther Dahl |
| Samskiftið | Gordon Rajani |
| Gistingarhús- og Matstovufelag Føroya | Egon Joensen |
| Ráðgevarafelagið | Marita Rasmussen |
| Ferðavinnufelagið | Egon Joensen |
| Felagið Peningastovnar | Gordon Rajani |

Vinnugreinafeløgini fáast við spurningar, ið eru viðkomandi fyri teirra vinnugrein.

Vinnugreinafeløgini arbeiða sjálvstøðugt við sínum málum.

Størri mál, sum viðkoma fleiri vinnugreinum ella allari vinnuni, verða samskipaði av umsitingini í Vinnuhúsinum og Føroya Arbeiðsgevarafelag. Vinnugreinafeløgini hava ikki ábyrgd av sáttmálasamráðingum.

## *Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag*

Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag leggur linjurnar fyri arbeiðnum í Vinnuhúsinum.

Í nevndini sita:



**Jóhan Páll Joensen, formaður**

Jóhan Páll Joensen er stjóri í útflutningsfyritøkuni Maru Seafood. Harafturat er hann nevndarlimur í føroyskum fiskivinnufyritøkum. Jóhan Páll Joensen hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 1997 og sum formaður felagsins síðan 2004.



**Kristoffur Laksá, næstformaður**

Kristoffur Laksá er nevndarformaður í prentsmiðjuni Estra í Gøtu. Kristoffur er eisini næstformaður í Føroya Prentsmiðjufelag umframt nevndarlimur í fleiri føroyskum fyritøkum. Kristoffur Láksá hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 1993.



**Bergur Poulsen, nevndarlimur**

Bergur Poulsen er stjóri á fiskamjøls- og fóðurfyritøkuni Havsbrún í Fulgafirði. Harafturat er Bergur nevndarformaður og -limur í fleiri fyritøkum innan føroysku alivinnuna. Bergur hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 1993.



**Magni Arge, nevndarlimur**

Magni Arge er stjóri í flogfelagnum Atlantic Airways. Magni er eisini nevndarformaður í Oljuvinnufelagnum umframt nevndarformaður og -limur í fleiri fyritøkum innan føroysku ferðavinnuna. Magni hevur sitið sum nevndarlimur í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 1998.



**Jón Danielsen, nevndarlimur**

Jón Danielsen er stjóri og íverksetari av byggifyritøkuni Articon. Jón er nevndarlimur í Føroya Handverksmeistarafelag umframt nevndarlimur í øðrum føroyskum fyritøkum. Jón Danielsen hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2004.



**Meinhard Jacobsen, nevndarlimur**

Meinhard Jacobsen er stjóri í útflutningsfyritøkuni Faroe Seafood. Harafturat er Meinhard nevndarlimur í fleiri føroyskum fyritøkum. Meinhard hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2007.



**Jóhanna á Bergi, nevndarlimur**

Jóhanna á Bergi er stjóri á flutningsfyritøkuni Faroe Ship. Harumframt er Jóhanna nevndarlimur í fleiri føroyskum fyrtøkum. Jóhanna hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2008.

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY